GERÐABÓK

Dato: 22. oktober 2026 **Kl**. 16:00
Stað: Býráðssalurin
Málsnr: 270/26-291/26

FUNDARLEIÐARI:
Elsa Berg

VIÐ LUTTØKU AV:
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

LUTTÓKU EISINI:
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Øssur Patursson

LUTTÓKU IKKI:

SKRIVARI:
Jóan Petur Hentze

PROTOKOLLFØRARI:
Olga Knudsen/Anna Brekku Havmand

Innihaldsyvirlit **Síða**

Til viðgerðar

270/26	26/00448-1	Mál beind í nevndir 2026	1039
271/26	26/05097-1	Ábyrgd av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur flutt til kommunurnar - fígging	1041
272/26	26/04235-4	Bilfríir dagar í miðbýnum	1045
273/26	26/07345-1	Umvælingar av Lágargarði - matr nr. 674a, Tórshavn	1050
274/26	25/00828-2	Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn - 24/08980	1052
275/26	26/02792-1	Broyting av ásetingum um byggi- og nýtlsutstig fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini	1057
276/26	26/04934-1	Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 66, Nólsoy – 21/02199	1062
277/26	25/01104-1	Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað	1065
278/26	26/03252-5	Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri kaldbak, matr. nr. 49m	1074
279/26	25/06231-2	Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624	1078
280/26	26/01571-2	Broytan av prísum / takstum í Navision - graviloyvir o.a.	1085
281/26	26/01673-1	Pumpustøð á Hvítanesi	1087
282/26	26/07273-1	Útboð av hegning av girðingararbeiði í TK	1091
283/26	26/07279-1	Tórshavnar havn - ISPS skipan á skansabryggjuni og eystaru bryggju	1093
284/26	25/02775-9	Keyp av matr.nr. 283a, Kollafjørður. Signabøur.	1095
285/26	25/10113-2	Stovnan av almannagagnligum bústaðarfelag	1097
286/26	25/00180-1	Val av 5 limum í gøtunavnanevndina	1101
287/26	26/07503-1	Dagføring av játtanarreglum	1102
288/26	26/04948-1	Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna	1104
289/26	26/00100-1	Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026	1111
290/26	25/02101-1	Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir - 21/04713	1115
291/26	26/04459-1	Tórshavnar havn - Verkætlanin fyri útiøkið kring nýggja terminalin "Molin"	1120

Til viðgerðar

270/26 Mál beind í nevndir 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Býráðsfundur	29.01.2026	3/26	26/00448-1
2 Býráðsfundur	26.02.2026	26/26	26/00448-1
3 Býráðsfundur	19.03.2026	73/26	26/00448-1
4 Býráðsfundur	30.04.2026	104/26	26/00448-1
5 Býráðsfundur	04.06.2026	174/26	26/00448-1
6 Býráðsfundur	18.06.2026	203/26	26/00448-1
7 Býráðsfundur	17.09.2026	240/26	26/00448-1
8 Býráðsfundur	22.10.2026	270/26	26/00448-1

Upprunin til málið

Lýsing av málinum

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	**Fyri ávís økir í kommununi**	**Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**	**Fyri vinnuna**
Umsitingaravleiðingar				

Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:

Býráðsfundur 29. januar 2026: Tikið til eftirtektar.

Býráðsfundur 26. februar 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 19. mars 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 18. juni 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Framlagt.

271/26 Ábyrgd av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur flutt til kommunurnar - fígging

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Mentamálanevndin	08.09.2026	104/26	26/05097-1
2 Heilsu- og eldranevndin	03.09.2026	21/26	26/05097-1
3 Fíggjarnevndin	09.09.2026	184/26	26/05097-1
4 Býráðsfundur	17.09.2026	261/26	26/05097-1
5 Býráðsfundur	22.10.2026	271/26	26/05097-1

Upprunin til málið
Upprunin til málið er, at ábyrgdin av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur bleiv flutt til kommunurnar 1. januar 2026.

Lýsing av málinum
Løgtingið hevur samtykt, at kommunurnar ikki longur skulu rinda kommunala rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing til landið. Rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing, sum kommunurnar sleppa undan at rinda, skal fíggja yvirtøkuna av ábyrgdini av tænastunum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur.

Upprunaliga játtanin til 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur í 2026 er 1.656 t.kr., samstundis er eitt framflutt hall frá undanfarnum árum á 858 t.kr, sostatt er tøka netto játtanin í 798 t.kr. at flyta til 2722 – Tilboð og tiltøk.

2026

4201 - Endurgjald til lærlingaútreiðslur

	t.kr.
Upprunalig fíggjarætlan 2026	1.656
Framflutt hall frá undanfarnum árum	-858
	798
Eykajáttan 2026 Flutt av 4201 til 2722	**-798**
	0

2722 – Tilboð

	t.kr.
Fíggjarætlan 2026	0
Framflutt hall frá undanfarnum árum	0
	0
Eykajáttan 2026 Flutt á 2722 frá 4201	**798**
	798

Mettur fíggjartørvur í 2027 á 2722 Tilboð og tænastur til at veita tænastur til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur, sum kommunan hevur fingið sambært lógarbroytingini 1. januar 2026, er 2.500 t.kr.

1.656 t.kr. verður flutt frá 4201 Endurgjald til læringaútreiðslur í samband við fíggjarætlan 2027 og mettur tørvur á meir fígging er sostatt 844 t.kr.

2027

2722 – Tilboð

	t.kr.
Fíggjarætlan 2027, mettur fíggjartørvur	2.500
Flutt frá 4201 - Endurgjald fyri lærlingaútreiðslur	-1.656
Mettur tørvur á meir fígging ísv. fíggjarætlan 2027	**844**

Lógir, ásetingar o.a.
Víst verður til løgtingsmálini:

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
(Ábyrgdin av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommununar), sum broytt 4. desember 2025.

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisskúlar og løgtingslóg um skúladepil í Marknagili, broytt 24. november 2025
(Avtaka kommunala rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing)

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd **Ja** ☐ **Nei** ☒

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

	Býráðsfundur 22. oktober 2026	Blað nr.: 1043 Forkvinnunnar merki:

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
4201		Endurgjald til lærlinga-útreiðslur

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
2722		Tilboð	

Upphædd
798 t.kr.

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Miðfyrisitingarstjórin, Trivnaðarstjórin og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla til,

- at 798 t.kr. verða fluttar av kontu 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur á kontu 2722 Tilboð og tiltøk og at konta 4201 samstundis verður niðurløgd. Tørvur á meir fígging í 2026 verður kláraður innanfyri verandi játtan á 2722 Tilboð og tiltøk.
- at hædd verður tikin fyri tørvinum á meir fígging á 2722 Tilboð og tiltøk á fíggjarætlanini fyri 2027.
- at málið verður beint í mentamálanevndina og heilsu- og eldranevndina til kunningar.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Heilsu- og eldranevndin 03. september 2026: Kunnað varð um málið.

Mentamálanevndin 08. september 2026: Kunnað varð um málið.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Býráðsfundur 17. september 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

272/26 Bilfríir dagar í miðbýnum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	01.06.2026	141/26	26/04235-4
2 Tekniska nevnd	01.06.2026	74/26	26/04235-4
3 Ferðslunevndin	08.06.2026	10/26	26/04235-4
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	15.06.2026	161/26	26/04235-4
5 Tekniska nevnd	07.09.2026	84/26	26/04235-4
6 Vinnunevndin	07.09.2026	25/26	26/04235-4
7 Fíggjarnevndin	09.09.2026	170/26	26/04235-4
8 Býráðsfundur	17.09.2026	249/26	26/04235-4
9 Býráðsfundur	22.10.2026	272/26	26/04235-4

Upprunin til málið
Samgongan hevur ynski um, at gongugøtan, Niels Finsens gøta, frá Ráðhúsinum og niðan í Steinatún, verður ferðslufrí og eitt gott øki til frið og samveru í ávís tíðarskeið um summarhálvuna og vetrarhálvuna. Tað skal einans verða koyrandi av Tinghúsvegnum oman til Tórsgøtu umvegis Sverrisgøtu.

Lýsing av málinum
Seinastu árini hava verið ymisk átøk í handilsgøtuni, serliga er afturvendandi árliga tiltakið Jólabýurin í desember mánaði. Tílík átøk savna borgarar og skapa lív í miðbýnum ávís tíðarskeið, men fyri at tílík tiltøk kunnu lata seg gera, er neyðugt at sperra økið fyri almenna ferðslu í ávísum tíðarskeiðum. Ynskiligt er, at gongugøtan skiftir ham, alt eftir um talan er um summar ella vetur, eitt nú í juli og desember mánaði.

At byrja við verður mett ráðiligt, at gongugøtan verður stongd fyri almennari ferðslu ein mánað um summarið og ein mánað um veturin, t.e. í juli og desembur. Fyri at átakið skal eydnast, er týdningarmikið, at gongugøtan verður virkin í ávísu tíðarskeiðunum, tá hon verður stongd.

Mett verður ráðiligt, at tá gongugøtan verður stongd, verða ymisk tiltøk skipað, hetta fyri at draga borgarar oman í býin og fyri skipa gongugøtuna við øðrum enn til bilar.
Tað er sjálvandi sera týdningarmikið at tiltøkini taka atlit til, at vørukoyring letur seg gera, t.d. avmarkað tíðarskeið, umframt at hýruvognar fáa avsett øki til teirra virksemið.

Men fyri at hetta skal kunna lata seg gera, verður mælt til, og er tað sera týdningarmikið, at tey virkandi í gongugøtuni verða hoyrd og kunnað, og møguliga kunnu tey luttaka við ávísum virksemi á gongugøtuni ávísu tíðarskeiðini. Eisini er hugsað, at Miðbýarfelagið skal takast við upp á ráð, tí tað kann eisini vísa seg, at ávíst virksemi í miðbýnum hevur áhugað í at luttaka í hesum tiltakinum.

Tað er serliga kent uttanlands, at handils miðbýarfeløg í felag standa saman um at skipa fyri ymiskum tiltøkum, soleiðis at borgarar verða drignir í býin at uppihalda sær. Eisini síggja vit nakað líknandi á eitt nú torginum í SMS, og tá einstakir handlar skipa fyri serligum døgum til frama fyri at draga fólk til teirra handil.

Lógir, ásetingar o.a.
-

Upplýsingar frá umsitingini

Kommunan royndi nakað líknandi í 2022, í sambandi við at Vágsbotntorgið varð skipað til eitt økið til trivnað og uppihald. Í summarhálvuni varð samskipari settur at skipa fyri ymiskum tiltøkum á Vágsbotntorginum, soleiðis at torgið kundi inntakast til ymisk endamál. Tað var Visit Tórshavn, sum saman við tíðarsetta samskiparanum stóð fyri at samskipa tiltøkini, soleiðis at økið varð í brúk. Hetta varð sera væl eydnað og vóru borgarar sum heild sera væl nøgdir við ymisku tiltøkini. Eftirfylgjandi síggja vit eisini, at ávísir felagsskapir hava gjørt til vana at brúka Vágsbotntorgið til teirra tiltøk.

Tvey byggimál eru ávegis á matr. nr. 369 og 370, Tórshavn, Sverrisgøta 11 og 12. Tað kann hugsast, at verkætlanirnar verða settar í verk tvørtur um summarið. Umsøkjari er spurdur, um verkætlanin kemur at ávirka ferðsluna á Sverrisgøtu í byggitíðarskeiðinum, og var svarið, at tað er heilt óbetýðiligt, tí tað verður ikki neyðugt at steingja vegin av í byggitíðarskeiðinum.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
22/01036, Menning av Vágsbotni

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Málið er viðgjørt og avrátt millum Stjórnarskrivstovuna, Teknisku deild, Býarskipanardeildina og Visit Tórshavn.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
-

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei
Av tí at talan er um eina verkætlan, sum fevnir um at aktivera gongugøtuna, verður mælt til, at Visit Tórshavn stendur fyri átakinum, og at játtanin so statt verður flutt teimum at handfara.

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
6275	LK62999	Fríðkan av býnum	7312		Vinnutiltøk		300.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	300.000
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	0

Tilmæli:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at gongugøtan, N. Finsensgøtu, frá Káta Horninum til og við Vaglið, verður stongd í tíðarskeiðinum juli 2026 og desember 2026, sum ein roynd fyri at økja um trivnaðin hjá borgarum, ábæru ferðsluni og vinnuni í býnum,
- at økið verður skipað, soleiðis at vøruvognar sleppa til handlar o.a. virksemi við vørukoyring ávís tíðarskeið á degnum,
- at økið verður sett av til hýruvognar millum ráðhúsið og Havnará

- at Visit Tórshavn stendur fyri at samskipa tiltakið/verkætlanina, og í hesum sambandinum somuleiðis stendur fyri at kunna og hoyra vinnuna í miðbýnum,
- at kr. 300.000 verða játtaðar av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), løgukarmi LK62999, Fríðkan av býnum til kt. 7312, Vinnutiltøk,
- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá tiltøkini hava verið, við eini eftirmeting, um verkætlanin skal endurtakast í 2027,
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd, ferðslunevndina og fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026: Málið útsett.

Tekniska nevnd 01. juni 2026: Málið útsett. Nevndin ynskir, at umsitingin hoyrir vinnuna, og at málið verður beint í vinnunevndina.

Ískoyti:
Til umrøðu í ferðslunevndini.

Ferðslunevndin 08. juni 2026: Málið umrøtt.

Ískoyti:
Av tí at tað er avmarkað við tíð til at gera neyðugu fyrireikingarnar, umframt at ymiskar um- og nýbyggingar verða framdar í miðbýnum yvir summarið, so verður ikki mett ráðiligt at raðfesta átakið at gera miðbýin bilfrían í summar 2026.

Harafturímóti, so verður mælt til, at umrødda økið verður bilfrítt í vetur í sambandi við Jól í miðbýnum, og í summar 2027. Fyrireikingararbeiðið skal setast á breddan, væl áðrenn vegirnir verða stongdir, soleiðis at virkandi í økinum hava stundir at fyrireika seg til átakið, og soleiðis at Visit Tórshavn hevur stundir at fyrireika ítøkiligu átøkini væl áðrenn.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Sak**	**Upphædd**
6275	LK62999	Fríðkan av býnum	7312		Vinnutiltøk	Jól í miðbýnum	300.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	300.000
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	0

Viðv. fíggingini til átakið summar 2027 verður mælt til, at fígging verður raðfest til hetta á fíggjarætlanini 2027.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at útseta átakið, bilfríir dagar í miðbýnum til í vetur 2026 og summar 2027
- at gongugøtan, N. Finsensgøtu, frá Káta Horninum til og við Vaglið, verður stongd í tíðarskeiðinum desember 2026 og juli 2027, sum ein roynd fyri at økja um trivnaðin hjá borgarum, ábæru ferðsluni og vinnuni í býnum,
- at økið verður skipað, soleiðis at vøruvognar sleppa til handlar o.a. virksemi við vørukoyring ávís tíðarskeið á degnum,
- at økið verður sett av til hýruvognar millum ráðhúsið og Havnará
- at Visit Tórshavn stendur fyri at samskipa tiltøkini/verkætlanina, og í hesum sambandinum somuleiðis stendur fyri at kunna og hoyra vinnuna í miðbýnum,
- at kr. 300.000 verða játtaðar av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), løgukarmi LK62999, Fríðkan av býnum til kt. 7312, Vinnutiltøk,
- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá tiltøkini hava verið, við eini eftirmeting,
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd, vinnunevndina og fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2026: Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd, vinnunevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

Heidi Lava Elgeirsdóttir var ikki við í viðgerðini av málinum.

Tekniska nevnd 07. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at møguleiki verður hjá hýruvognum at tæna borgarum optimalt á Vaglinum, og at vegforðingin verður sett beint við standmyndina av Sóparanum, og at skeltið verður blendað.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

Vinnunevndin 07. september 2026: Samtykt at taka undir við byggi- og býrarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 17. september 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við aðru viðgerð við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

273/26 Umvælingar av Lágargarði - matr nr. 674a, Tórshavn

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Heilsu- og eldranevndin	01.10.2026	25/26	26/07345-1
2 Fíggjarnevndin	07.10.2026	195/26	26/07345-1
3 Býráðsfundur	22.10.2026	273/26	26/07345-1

Upprunin til málið
Hin 11 des. 2025 samtykti Býráðið at játtað 2. mió. av meirinntøkunum í 2024 til tillagingar á Lágargarði. Av hesum fóru 1,2 mió. til løgu L27015 - Køkur á Lágargarði og restin skuldi nýtast til demensvinarlig átøk á Lágargarði.

Lýsing av málinum
Í samráð við leiðsluna á Lágargarði hevur Bygningsdeildin arbeitt við møguligum átøkum á dementsdeildunum. Niðurstøðan er, at peningurin er best nýttir til at betra um akustisku og ljós viðurskiftini á deildunum. Góðar royndir eru av at leggja mineralulls-plátur á raftir undir verandi loft. Samstundis verða nýggj loftsljós við døgnrytmustýring monterað á nýggju loftini.

Mett verður at kostnaðurin av nýggjum loftum og ljósum verður á leið 0,6 mió. á hvørji deild – ella tilsamans 1,2 mió.

Á 2775 LK 27999 Eldrarøkt eru 1.018 mió kr.

Ætlanin er at flyta 1.018 mió kr. av 2775-LK27999 til nýggja verkætlan demensvinarlig átøk á Lágargarði. L270xx til at tryggja ljós og ljóðviðurskiftini á tveimum demensdeildum á Lágargarði. Írestandi upphæddin á áleið 0.2 mió. kr verður fíggjað av rakstarkonto 6110 umsiting og røkt av bygningum.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

	Býráðsfundur 22. oktober 2026	Blað nr.: 1051 Forkvinnunnar merki:

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
2775	LK27999	Eldrarøkt	2775	L270xx	Átøk á Demens-deildum á Lágargarði	X	1.018 mió. kr

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	1.018 mio. kr.
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026/2027
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	0

Tilmæli:
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til

- at játtað 1.018 mio kr. av 2775 – LK27999 til nýggja verkætlan 2775 – L270xx nevnd “Átøk á Demensdeildum á Lágargarði”
- At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Heilsu- og eldranevndin 01. oktober 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Einmælt samtykt.

274/26 Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn - 24/08980

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	21.11.2025	179/25	25/00828-2
2 Býráðsfundur	11.12.2025	284/25	25/00828-2
3 Byggi- og býarskipanarnevndin	13.04.2026	88/26	25/00828-2
4 Býráðsfundur	30.04.2026	122/26	25/00828-2
5 Býráðsfundur	05.05.2026	155/26	25/00828-2
6 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	204/26	25/00828-2
7 Býráðsfundur	22.10.2026	274/26	25/00828-2

Upprunin til málið
Fyrispurningur um sundurbýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv, varð í desembur 2024 frámælt av umsitingini, m.a. tí at matrikulin lá í 4. grundumráði, sí skjal *184/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 11.12.2024.* Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti í tí sambandi m.a. at broyta byggisamtyktina fyri útstykkingina, sum matr. nr. 1341d er partur av.

Lýsing av málinum
Matr. nr. 1341d er partur av útstykking, ið varð gjørd í seinnu helvt av 80'unum. Tá útstykkingarætlanin varð skipað, lá økið sum sethúsaøki í byggisamtyktini. Í sambandi við ætlanir um innkomuveg oman fyri økið, varð ovari partur av økinum í 90'unum broytt til 4. grundumráði. Ætlaninar við innkomuvegnum eru sum kunnugt broyttar, og neyðugt er tískil ikki at halda fast í vegalinjuni, ið varð løgd í 90'unum.

Av tí at talan er um útstykkingarætlan, ið varð góðkend av býráðnum í øki, sum lá í sethúsaøki, umframt at linjuføringin av innkomuvegnum varð broytt, verður mett ráðiligt at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at øll útstykkingin liggur í A1 sethúsaøki.

Lógir, ásetingar o.a.
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2 fyri stakhús og 300 m^2 fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.
- Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

Upplýsingar frá umsitingini
Kommunan eigur tveir av matriklunum í útstykkingini, matr. nr. 1341c og 1341e. Í samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevdnini frá 11. desember 2024, mál 24/08980, varð, umframt at broyta byggisamtyktina fyri økið, eisini samtykt, at kommunan skuldi fara undir at kanna, um til bar at fremja makaskifti, soleiðis at

kommunan kundi fáa matr. nr. 1341h og 1341m í býti við stykkini, sum kommunan eigur. Hetta verður mett vera skynsamt í mun til eina framtíðar víðkan av vegnum undir Krákugjógv. Mælt verður til, at stjórnarskrivstovan stendur fyri samráðingum hesum viðíkjandi, og at hetta verður lýst í nýggjum máli um makaskifti.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn*, journal nr. 24/08980.

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

-

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting*, journal nr. 25/00828-4.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*, journal nr. 25/00828-4.
- *AB 1982,* journal nr. 25/00828-4.
- *AB 1996*, journal nr. 25/00828-4.
- *184/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 11.12.2024,* journal nr. 24/08980.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1341f, 1341d, 1341e, 1341c, 1341b og 1341g frá 4. grundumráði til A1 øki.
- at beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 11. desember 2025: atkvøtt varð um tilmælið, ið bleiv samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson

Ískoyti:

Í sambandi við almennu hoyringina, sum var 16. desember 2025 til 7. februar 2026, komu tvær viðmerkingar – báðar frá eigarum av ognum í nærøkinum, ið føra fram ynski um at broyta byggisamtyktirnar fyri ognirnar frá landbúnaðarøki til A1 øki, sí skjal *kort, matr. nr. 1344a og 1233e.*

Í tí fyrstu viðmerkingini, sí skjal *Viðmerking – Tommy Jacobsen,* verður ynski ført fram um at matr. nr. 1233e somuleiðis verður broytt frá 4. grundumráðið, landbúnaðarøki, til A1, sethúsaøki. Orsøkin er, at talan er um ogn við ástandandi sethúsum, og gera galdandi ásetingar fyri ognina tað trupult, tá umbyggingar og broytingar skulu gerast.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Ognin er uml. 1700 m^2 til víddar. Í løtuni eru eini sethús á ognini. Um øll ognin verður broytt til A1 øki, kann ognin býtast í uml. 3 sethúsagrundstykki. Ognin liggur við endan á vegnum har Norðari Ringvegur og Oyggjarvegurin møtast, og verður tað mett óheppið, um fleiri ognir verða knýttar at júst hesum vegastrekkinum. Harumframt liggur ognin vestan fyri Oyggjarvegin, og eingi sethúsaøki eru hesumegin Oyggjarvegin, sum verður mettur at verða býarmarkið móti vestri/norði. Tískil verður mælt frá at ganga viðmerkingini á møti.

Seinna viðmerkingin, sí skjal *Viðmerking – Bjarni Beder o.fl.*, snýr seg um, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 1344a verður broytt, soleiðis at øll ognin verður A1 sethúsaøki.

Viðmerking frá umsitingini:
Stórsti parturin av matr. nr. 1344a liggur frammanundan í A1 øki og økið, ið søkt verður um at broyta til A1 øki, liggur millum tvær útstykkingar, útstykkingin á Ryskigøtu og undir Krákugjógv. Soleiðis hevði ein tílík broyting fylgt eini natúrligari byggilinju móti vestri og niðan móti Húsahaga. Tískil verður mælt til at ganga umsóknini á møti.

Skjøl
- *Kort, matr. nr. 1344a og 1233e,* journal nr. 25/00828-15.
- *Viðmerking – Tommy Jacobsen,* journal nr. 25/00828-16.
- *Viðmerking – Bjarni Beder o.fl.,* journal nr. 25/00828-16.

Tilmæli
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- Ikki at ganga ynskinum í skjal *Viðmerking – Tommy Jacobsen* á møti.
- at ganga ynskinum í skjal *Viðmerking . Bjarni Beder o.fl.* á møti.
- at loyva sundurbýti av matr. nr. 1341d, sum samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 11. desember 2024, mál 24/08980.
- beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1344a, Tórshavn, soleiðis at allur matrikulin verður fevndur av A1 øki, hevur ligið til almenna hoyring frá 12. mai til 23. juni. Í tí sambandi er ein viðmerking innkomin frá Eigarafelagnum Ryskigøta, sí skjal 25/00828-25 - *Mótmælisskriv til Tórshavnar kommunu,* sum er útstykkingin, sum liggur beint norðan fyri matr. nr. 1344a.

Niðanfyri er ein samandráttur av viðmerkingunum frá Eigarafelagnum Ryskigøta:

- Ognirnar á Ryskigøtu keyptar undir øðrum fortreytum. Tá varð víst á tekning við m.a. blindvegum.
- Stúra fyri, at blindvegir verða opnaðir, og fleiri hús/íbúðir verða íbundin. Hetta førir til meira ferðslu og harvið minni trygd fyri børnini.
- Ryskigøta sum blindvegur er avgerandi fyri at varðveita trygd, ró og avmarkaða ferðslu í økinum.
- Sýrugøta møguliga leingjast suðureftir og knýtast saman við Ryskigøtu.
- Eingin heildarætlan gjørd. Ein tílík eigur at verða gjørd, og skal lýsa ferðsluviðurskifti, trygd, vegføring, bústaðarsløg, tvínað og samlaða ávirkan á grannalagið.
- Stúra fyri størri íbúðarbygningum, sum ikki er í samsvar við ella náttúrligur partur av verandi sethúsaøki á Ryskigøtu.
- Undrast á, at eingin grannahoyring hevur verið.
- Ynskja at verða tikin við í tilgongdini, at hoyra meira um ætlanirnar og at koma við viðmerkingum, áðrenn málið verður endaliga avgjørt.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Viðmerkingarnar vísa á eina stúran fyri, hvat fer at henda í økinum í framtíðini. Almenna byggisamtyktin og broytingar av hesari eru ikki altíð tengdar at, ella treytaðar av, eini ítøkiligari ætlan fyri eitt øki, men útleggja økið til framtíðar menning innan karmarnar í byggisamtyktini. Henda broytingin er eitt tílíkt dømi, har tað ikki er ein ítøkilig útstykkingarætlan ella líknandi, ið liggur til grund fyri broytingini. Orsøkin er hinvegin at flyta býarmarkið, soleiðis at tað fylgir sama markinum, sum er longur niðan eftir Villingadalsvegnum og móti Húsareyni. Harumframt snýr broytingin seg um at broyta byggisamtyktina fyri uml. 1/3 av eini ogn, har hinir 2/3 frammanundan liggja sum A1 øki, og yvirskipað verður tað mett mest skynsamt, um ognir liggja í sama umráðisparti.

Av tí at eingin ítøkilig ætlan liggur til grund fyri broytingaruppskotinum, er tað trupult at svara fleiri av viðmerkingunum frá eigarafelagnum. Niðanfyri er tó svar uppá viðmerkingarnar, í tann mun tað ber til at svara.

- Útstykkingin Ryskigøta er ein privat útstykking, og hevur kommunan ikki innlit í, hvat sølutilfar varð nýtt í sambandi við søluna. Tó lógu 2/3 av matr. nr. 1344a sum A1 sethúsaøki, og tískil var sannlíkt, at henda ognin fyrr ella seinni fór at verða útstykkjað.
- Tað er enn ikki greitt, um ein møgulig framtíðar útstykking á matr. nr. 1344a verður bundin í vegirnar á Ryskigøtu ella Sýrugøtu – ella allar tríggjar. Men mest sannlíkt er, at onkur av hesum verður nýttur sum atkoma til eina møguliga útstykking.
- Um matr. nr. 1344a verður stykkjað til sethús og bundið í teir báðar vegirnar á Ryskigøtu, so verða uml. 6 sethús knýtt afturat hvørjum av vegunum. Hetta verður ikki mett at broyta munandi uppá ferðsluviðurskiftini ella trygdina. Hinvegin verður tað mett skynsamt og burðardygt, at nýta tað infrakervið, ið frammanundan er í økinum.
- Um økið skal stykkjast út, skal hetta gerast samsvarandi einari góðkendari útstykkingarætlan. Um ein tílík verður gjørd, og um hon verður mett at hava ítøkiliga, týðandi og einsæris ávirkan á t.d. grannaognir, so verða hesi hoyrd í ítøkiliga málinum um útstykkingarætlanina, áðrenn kommunan tekur avgerð um eina slíka útstykkingarætlan
- A1 øki er ætlað sethúsabygging og ikki íbúðarbygging. Um íbúðarbygging skal loyvast í økinum, skal ein serstøk byggisamtykt gerast fyri økið, og skal hendan somuleiðis til almenna hoyring. Men sum áður skrivað, so er kommunan ikki vitandi um nakra ítøkiliga ætlan á økinum, og hevur tískil ikki viðgjørt eina tílíka støðu.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum um at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at allur matr. nr. 1344a, Tórshavn liggur í A1 øki, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdótti og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður blankt.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

275/26 Broyting av ásetingum um byggi- og nýtlsutstig fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	20.04.2026	114/26	26/02792-1
2 Býráðsfundur	30.04.2026	124/26	26/02792-1
3 Býráðsfundur	05.05.2026	157/26	26/02792-1
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	202/26	26/02792-1
5 Býráðsfundur	22.10.2026	275/26	26/02792-1

Upprunin til málið
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu viðger í løtuni nakrar umsóknir um bústaðarbygging í umráðisparti A1, sum ikki eru í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri økið, men sum annars politiskt og býarskipanarliga verða mettar sum ætlanir, ið gagna býnum, eru í samsvari við ymiskar ætlanir og politikkir, t.d. Bústaðarpolitikkin, umframt at tær eru í samsvari við yvirskipaða ynskið um at gagnnýta avmarkaða lendið í Tórshavnar kommunu á mest skynsama hátt og býartætta. Tá bygging ikki er í samsvari við almennu byggisamtyktina, men man annars tekur undir við ætlanini, er møguleikin fyri at gera serstakar byggisamtyktir mest nýtta býarskipanarliga amboðið. Almenna byggisamtyktin fyri umráðispartin skal tó heimila, at vikið verður frá ávísu ásetingini, og fyri umráðispart A1 er eingin heimild at víkja frá ásetingunum um byggi- og nýtslustig, sum tað annars verður loyvt í øðrum umráðispørtum.

Lýsing av málinum
Í øllum umráðispørtum í kommununi eru ásetingar um bygging so sum byggistig, nýtslustig og hæddir ásettar í almennu byggisamtyktini. Somuleiðis stendur lýst, hvørjum ásetingum víkjast kann frá, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Hetta er eitt nógv nýtt amboð í fleiri ymiskum byggiøkjum, og verður nýtt til at skipa tann avmarkaða umráðispartin nærri í mun til nærumhvørvi, politikkir og ætlanir í kommununi og tílíkt.

Fyri umráðispart A1 er ásett, at víkjast kann frá ásetingunum um nýtslu av økinum, minst loyvdu grundstykkjavídd og mest loyvdu hæddum. Mett verður, at tað somuleiðis átti at verið loyvt at vikið frá ásetingunum um mest loyvda byggi- og nýtslustig fyri eitt natúrligt avmarkað økið.

Lógir, ásetingar o.a.
Ásetingar fyri umráðispart A1 í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

1. Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru minni enn 200 m^2 ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m^2 og 500 m^2 verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.
7. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
8. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
9. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.
12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Upplýsingar frá umsitingini
Tað kunnu vera fleiri orsøkir til, at hægri byggi- og nýtslustig er neyðugt fyri víðari menningina av bústaðarøkjum. T.d. eru fleiri bygningar í bústaðarøkjum, sum áður hava verið vinnubygningar, og høvdu

verið væl egnaðir at broytt til íbúðarbygningar. Hesir eru ofta bygdir, áðrenn økið varð lagt til bústaðarøki, og hava hægri byggi- og nýtslustig enn annars loyvt í umráðispartinum. Galdandi ásetingar gera, at byggiloyvi ikki kann gevast til nýggja virksemið, uttan at bygningurin minkar, so hann er í samsvari við mest loyvda byggi- og nýtslustig fyri umráðispartin, og hetta ger, at nógvar tílíkar verkætlanir detta niðurfyri.

Tað kunnu eisini verða viðurskifti so sum ynskið at byggja parkeringskjallara, og harvið hava størri fríøki. Parkeringskjallari telur við í nýtslustiginum, og tískil verður hetta ofta niðurraðfest av mennarum, hóast hetta annars býarskipanarliga verður mett vera skynsamt.

Av tí at mælt verður til at broyta ásetingina um, hvørjum víkjast kann frá í serstøkum byggisamtyktum í umráðisparti A1, verður somuleiðis mælt til at rætta ein feil í Kap. II, § 5, stk. 12. Í hesum punkti verður loyvt, at tað í serstakari byggisamtykt verður loyvt at víkja frá ásetingum um mest loyvdu hædd (stk. 8 og 9), men loyvt verður ikki, at vikið verður frá mest loyvdu hæddum (stk. 7). Ásetingarnar í stk. 7, 8 og 9 hanga saman, og tískil verður mælt til, at tað í serstakari byggisamtykt somuleiðis verður loyvt at víkja frá stk. 7.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

- *Broyting í ásetingum fyri umráðispart A1*, journal nr. 26/02792-2.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kap. II, § 5, stk. 12 verður broytt, soleiðis at tað í serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað økið somuleiðis verður loyvt at víkja frá ásetingum um byggistig (stk. 5), nýtslustig (stk. 6) og hæddir (stk. 7), og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 20. apríl 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Atkvøtt varð um tilmæli í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ískoyti:
Uppskotið til broyting av ásetingum um byggi- og nýtslustig í A1 øki í almennu byggisamtyktini, hevur ligið til almenna hoyring frá 12. mai til 23. juni. Í tí sambandi eru 22 viðmerkingar móttiknar. Viðmerkingarnar koma í stóran mun inn á somu viðurskifti, og tískil eru tær niðanfyri lýstar í mun til evni. Upprunaligu innkomnu viðmerkingarnar eru at síggja í skjali 26/02792-33, *Viðmerkingar – samlað yvirlit.*

1. **Ávirkan á verandi bústaðarviðurskifti og nærumhvørvi**
   Ein stórur partur av viðmerkingunum snúgva seg um, hvussu møguligir størri ella hægri bygningar kunnu ávirka fólk, sum longu búgva í økinum.

   Serliga verður víst á:
- Møguliga neiliga ávirkan á útsýni, privatlív og trivnað.
- At broytingar í byggistigi kunnu hava stórar og varandi avleiðingar fyri grannar og nærumhvørvið.
- At kommunan eigur at leggja líka stóran dent á at verja bústaðarviðurskifti hjá verandi borgarum, sum at skapa nýggjar byggimøguleikar.
- At broyting av byggistigi ikki eigur at verða framt, uttan atlit til fólk, sum longu búgva í økinum.
- At hægri bygging kann ávirka samleikan og útsjóndina í býnum.

Viðmerkingar frá umsitingini:
- Hetta uppskotið til broyting av ásetingum fyri umráðispart A1 í almennu byggisamtyktini snýr seg um, at tað við serstakari byggisamtykt kann bera til at hækka mest loyvda byggi- og nýtslustig. Uppskotið snýr seg ikki um at víðka møguleikan at byggja hægri.
- Kommunan ynskir at tætta um verandi bý, og er hetta eitt týdningarmikið amboð í hesum sambandi. Tó skal altíð takast neyðugt atlit til verandi grannalag og nærumhvørvi, og verður hetta viðgjørt sum partur av hvørjum einstøkum máli.
- Endamálið við broytingini er ikki at loyva bygging uttan atlit til verandi bústaðarviðurskifti, men at geva møguleika fyri eini neyvari meting av, hvat er hóskandi á ítøkiliga staðnum.
- Í sambandi við ítøkiligar byggiverkætlanir verða m.a. atlit tikin til ávirkan á grannar, nærumhvørvi, býarmynd og verandi bústaðarviðurskifti.

2. **Byggireglur, undantøk og rættartrygd**
   Eitt annað av stóru evnunum snýr seg um, at uppskotið sambært viðmerkingunum gevur kommununi ov víðar heimildir at víkja frá galdandi reglum.

   Serliga verður víst á:
- At uppskotið gevur kommununi ov víða heimild at víkja frá ásetingum, sum higartil hava vart ljósviðurskifti, sólargang, útsýni og trivnað.
- At Býráðið sambært viðmerkingunum ov ofta og ov lætt gevur undantøk, har atlit til vinnuna verða sett fram um atlit til borgararnar.
- At ein óavmarkaður møguleiki at víkja frá kjarnuásetingunum kann geva fleiri trupulleikar enn hann loysir.
- At galdandi byggisamtykt er eitt týdningarmikið stýringsamboð, sum eigur at verða endurskoðað á ein skipaðan hátt, heldur enn at verða undirgravað við víðum undantøkum.
- At ov víðar heimildir kunnu gera politisku og umsitingarligu skipanina viðbrekna fyri trýsti.
- At óvissa um, hvat er galdandi, kann føra til, at borgarar kenna seg ójavnt viðgjørdar.
- At víðkaðar undantaksheimildir kunnu økja umsitingarligu arbeiðsbyrðuna, tí fleiri mál skulu metast ítøkiliga, og soleiðis gerst skipanin minni effektiv.

   Viðmerkingar frá umsitingini:

- Serstakar byggisamtyktir geva møguleika at tillaga bygging neyvari til ítøkilig øki og staðbundnar umstøður, tá hetta verður mett skynsamt og hóskandi.
- Serstakar byggisamtyktir skulu tó vera í samsvari við yvirskipaðar ætlanir og politikkir hjá kommununi, eitt nú Kommunuætlanina.
- Umsitingin tekur partvíst undir við stúranini um tørvin á greiðum og samanhangandi reglum. Ein víðkað heimild eigur ikki at verða brúkt til tilvildarliga viðgerð, men innan ein greiðan og gjøgnumskygdan karm.
- Høvuðsendamálið við uppskotinum til broyting var at loyva einum hægri byggi- og nýtslustigi, tá t.d. teir "eyka" bygdu fermetrarnir vórðu nýttir til parkeringskjallara, ella tá talan var um endurbygging/umbygging av einum vinnubygningini ella líknandi, ið stóð í bústaðarøkinum frammanundan. Tískil verður mælt til, at hetta verður útgreinað í nýggju ásetingini soleiðis:

"Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrlig avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 5 [byggistig] og 6 [nýtslustig], um talan er um:

- *umbygging av verandi bygging*
- *bygging, sum bert kann nýtast til parkering, goymslurúm ella líknandi*

Um henda ásetingin verður nýtt, kann ásetingin í Kap. II, § 25, stk. 8 ikki nýtast."

3. Greiningar, gjøgnumskygni og borgaraávirkan

Triðja høvuðsevni snýr seg um, at størri byggimøguleikar sambært viðmerkingunum eiga at verða fylgdir av greiðari krøvum um greiningar, upplýsingar og borgaraávirkan.

Serliga verður víst á:

- At áðrenn hægri ella størri bygningar verða loyvdir, eigur kommunan at krevja ítøkiligar greiningar av ávirkanini av dagsljósi, sólargangi, útsýni og trivnaði.
- At tað eigur at vera krav um samtykki frá grannum, sum verða beinleiðis ávirkaðir.
- At víðkaðir byggimøguleikar ikki eiga at føra til spekulatión, eitt nú í sambandi við Airbnb.
- At tað í staðin fyri størri byggistig eigur at verða umhugsað at geva størri møguleikar fyri útbygging í kjallarahædd, og at slík bygging ikki telur við í byggi- og nýtslustigi.

<u>Viðmerkingar frá umsitingini:</u>

- Í sambandi við at ítøkilig uppskot til serstakar byggisamtyktir verða gjørd, verða metingar/kanningar av ávirkanini á grannaøkini gjørdar.
- Býarskipan og ásetingar um bygging eru ein kommunal uppgáva. Møguleikin at byggja eftir galdandi og samtyktum ásetingum kann tí ikki sum meginregla vera treytað av samtykki frá einstøkum grannum.
- Atlit til grannar er tó ein týdningarmikil partur av málsviðgerðini, og er almenn hoyring, við m.a. borgaraframløgum, ein týðandi partur av málsgongdini.
- Í verandi løtu hevur kommunan ikki heimild at seta serstakar treytir í byggisamtyktum um spekulatión, Airbnb og tílíkt.
- Møguleikin fyri størri bygging í niðastu hædd verður ikki mettur at vera ein betri loysn, tí ein slík broyting kann hava aðrar avbjóðingar fyri nærumhvørvið og býarmyndina.

Tilmæli:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta orðingina í Kap. II, § 5, stk. 12 og 13 sambært viðhefta skjali *Broyting í ásetingum fyri umráðispart A1, sep. 2026* – journal nr. 26/02792-32 og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

276/26 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 66, Nólsoy – 21/02199

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	31.08.2026	179/26	26/04934-1
2 Nólsoyarnevndin	22.09.2026	8/26	26/04934-1
3 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	200/26	26/04934-1
4 Býráðsfundur	22.10.2026	276/26	26/04934-1

Upprunin til málið
Umsókn frá eigara av matr. nr. 66, Nólsoy, um at broyta byggisamtyktina fyri ognina, soleiðis at frítíðarbústaðir kunnu byggjast. Málið er áður viðgjørt í máli 21/02199.

Lýsing av málinum
Ynskið er at stykkja út og byggja 10-16 summarshús, sí skjal 26/04934-2 – *Støðumynd 2021.* Smb. ætlanini verður felags parkeringspláss við innkoyringina, og atkomuvegur verður til øll stykkini. Viðvíkjandi tekniskum viðurskiftum verður skrivað, at spillivatnsskipanin verður gjørd, so hon yvirheldur kunngerð um Spillivatn. Installatiónir so sum el, tele og vatn koma norður gjøgnum verandi veg og skipað verður fyri felags ruskinnsavnan við parkeringsplássið.

Matr. nr. 66 liggur norðuri í Stokkvík á Stongini í Nólsoy, sí skjal 26/04934-2 – *matr. nr. 66, Nólsoy*. Talan er um øki, ið liggur í óbygdum øki, uml. 0,5 km frá øðrum bygdum øki.

Lógir, ásetingar o.a.
Ásetingar fyri umráðispart F í byggisamtyktini fyri Nólsoy, eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til frítíðarøki, -hús og summarhús og tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi. Húsini kunnu einans nýtast til frítíð og ikki virka sum fastur bústaður, arbeiðspláss e.t.
- Grundstykkini skulu vera millum 200 – 300 m^2.
- Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki, og byggjast skal sambært góðkendari byggiætlan.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
- Hús skulu í mesta lagið verða bygd í einari hædd umframt nýttum lofti, og ikki vera hægri enn 3 m til hægsta punkt við útvegg og 6 m til mønuna.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 3 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt við útvegg.
- Frítíðar- og summarhús skulu íbindast skipaða kloakk og aðrar neyðugar leiðingar. Útreiðslur hesum viðvíkjandi verða rindaðar av eigarum.

Upplýsingar frá umsitingini
Eingin heildarætlan er fyri summarhúsøki í kommununi, men tað hevur verið ført fram, at ynskið er at betra um møguleikarnar fyri frítíðarhúsum í bygdunum – hetta m.a. við at loyva frítíðarbústøðum á loftum í neystum og við at leggja nýggj øki av til frítíðarhús í bygdum sum t.d. Hesti.

Tá skipað verður fyri økjum til summarhús, er skynsamt, at hesi liggja í útjaðaranum, men upp at tí bygda økinum, soleiðis at nærleiki er til almennar/felags hentleikar, uttan at nýggju økini gera seg ov nógv inn á bygdalagið. Í mun til matr. nr. 66, Nólsoy, so verður mett, at hetta økið liggur í so langt burtur frá bygda økinum annars. Ein avleiðing av hesi frástøðu kann verða, at fleiri ferðafólk taka bil við til Nólsoyar, sum annars ikki er vanligt.

Um økið verður bygt, verður bygdin víðkað munandi, og økið, ið annars liggur lutfalsliga órørt, verður inntikið. Hetta hevur týdning, tá hugsað verður um, at Nólsoyggin er útnevnd sum Ramsarøki, ið merkir, at oyggin hevur serligan altjóða týdning fyri náttúru- og lívmargfeldi. Ein ítøkilig kanning er ikki gjørd, men tað er eyðsæð, at náttúran og djóralívið í økinum hevði verið ávirkað, um summarhús vórðu bygd í økinum.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Málið varð fyrstu ferð viðgjørt politiskt í 2021, sí mál *Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 66, Nólsoy*. Umsitingin mælti frá broytingini, og umsóknin varð viðgjørd í byggi- og býarskipanarnevndini og Nólsoyarnevndini soleiðis:

- 13. september 2021 – Byggi- og býarskipanarnevndini: Samtykt at beina málið í Nólsoyarnevndina til hoyringar.
- 21. september 2021 – Nólsoyarnevndin: Staðbundna nevndin vil hava málið um summarhús yvirhøvur verður tikið upp á næstkomandi borgarafundi.

Júst tá var eingin borgarafundur í Nólsoy á skrá, og málið hevur ligið stilt, inntil tað varð umrøtt á borgarafundi í Nólsoy 8. juni 2026. Niðurstøðan á borgarafundinum var, at tað tóktist sum um, at Nólsoyingar ikki hava nakað ímóti, at frítíðarhús verða bygd í Nólsoy. Um hetta verður raðfest, so eigur hetta at verða gjørt í útkantinum – og ikki inni í bygdini. Tað er ynskilig, at fólkið býr í bygdini.

Annars var tað greitt á borgarafundinum, at stemningurin var, at hetta við frítíðarhúsum ikki eigur at koma fram um búseting ella bústaðabygging í bygdini.

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Viðmerkingar frá Teknisku deild:
Eingin viðmerking.

Viðmerkingar frá Byggimálsdeildin:
Um man broytir økið til summarhúsøki, so eigur man at umhugsa at minka parkeringsnormin, sum er 2,5 pláss pr. hús. Harumframt verður mett, at fráleikakrøv til áir eiga at verða sett.

Viðmerkingar frá Umhvørvisdeildini:
Umhvørvisdeildin heldur, at málið er væl lýst við atliti at teimum náttúru- og umhvørvisligu árinunum, sum ein útstykking til fleiri summarhús, so langt frá verandi bygd kann hava við sær.

Umhvørvisdeildin tekur undir við metingini hjá Býarskipanardeildini, at tað er óheppið at leggja nýggja bygging so langt frá verandi bygdum øki, serliga við atliti at náttúru- og umhvørvisvirðunum í Nólsoy og støðu oyggjarinnar sum Ramsarøki. Harafturat førir hetta við sær varandi økta bilaferðslu, har heiðafuglur reiðrast.

Umhvørvisdeildin er samd við tilmælinum frá Býarskipanardeildini um ikki at ganga umsóknini á møti.

Av tí at Nólsoyggin er Ramsarøkið, varð Umhvørvisstovan í stuttari telefonsamrøðu spurd um eina viðmerking. Har varð sagt, at tey allarhelst ikki høvdu viðmælt eini útstykking í økinum og um samtykt verður at útstykkja í økinum, eigur hetta at verða sent Umhvørvisstovuni og Ramsarnevndini til viðmerkingar. Annars varð víst á, at áhugi var fyri at verja stóran part av óbygdu økjunum í Nólsoy smb. Náttúruverndarlógini, men enn varð tað arbeiðið ikki komið nóg langt til at siga, júst hvørji øki talan var um.

Um tað verður samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið, verður uppskotið til broytingar sent friðingarmyndugleikanum til hoyringar.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐

Skjøl

Journal nr. 26/04934-2 – *Matr. nr. 66, Nólsoy.*
Journal nr. 26/04934-2 – *Støðumynd 2021.*

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti, av tí at:

- økið er ov langt burtur frá bygdini annars, og kann hetta fáa ymiskar neiligar avleiðingar, m.a. ávirkan á náttúru og økt bilaferðsla.
- ynskið er at varðveita lendið óbygt.

Og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Nólsoy.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026: Nevndin beinir málið í staðbundnu nevndina fyrst og síðani aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, áðrenn málið fer í býráðið.

Nólsoyarnevndin 22. september 2026: Umrøtt. Nevndin tekur undir við tilmælinum, vísandi til longu frástøðuna frá bygdini og ávirkanina á ferðsluna. Ynskiligt er, at staðseting nærri bygdini verður kannað.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Atkvøtt varð um tilmælið í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

277/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	10.02.2025	30/25	25/01104-1
2 Býráðsfundur	27.02.2025	63/25	25/01104-1
3 Byggi- og býarskipanarnevndin	31.03.2025	60/25	25/01104-1
4 Býráðsfundur	24.04.2025	111/25	25/01104-1
5 Byggi- og býarskipanarnevndin	12.01.2026	4/26	25/01104-1
6 Býráðsfundur	29.01.2026	11/26	25/01104-1
7 Byggi- og býarskipanarnevndin	09.03.2026	63/26	25/01104-1
8 Býráðsfundur	19.03.2026	82/26	25/01104-1
9 Byggi- og býarskipanarnevndin	13.04.2026	101/26	25/01104-1
10 Býráðsfundur	30.04.2026	129/26	25/01104-1
11 Býráðsfundur	05.05.2026	162/26	25/01104-1
12 Býráðsfundur	04.06.2026	186/26	25/01104-1
13 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	11.06.2026	13/26	25/01104-1
14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	07.09.2026	14/26	25/01104-1
15 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	203/26	25/01104-1
16 Býráðsfundur	22.10.2026	277/26	25/01104-1

Samanumtøka av málinum
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

Lýsing av málinum
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:

Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*
4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

> *Til 1 og 2:*
> *Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*
>
> *Til 3:*
> *Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spælipláss útiverupláss o.t.).*
> *Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*
>
> *Til 4:*
> *Orðingin "og tílíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

Lógir, ásetingar o.a.
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

Upplýsingar frá umsitingini
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at frískúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Skjøl
- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.
- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	**Fyri ávís økir í kommununi**	**Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**	**Fyri vinnuna**
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður*, *rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Býráðsfundur 27. februar 2025: Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

Ískoyti:

Viðmerkingar frá Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini:

Viðmerkingar til mál 21/03382. Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.

Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:

1) Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.

2) Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.

3) Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.

4) Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.

Á býráðsfundinum 27. februar 2025 gjørdu býráðslimir vart við viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini, og ivamál var, um byggi- og býarskipanarnevndin hevði tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

Býráðslimir mettu, at av tí at talan er um ógreið viðurskiftir og stórar prinsipiellar broytingar, so var best, at uppskotið varð dagført samsvarandi viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini, og at uppskotið harvið verður meira klárt, áðrenn uppskotið verður lagt til almenna hoyring.

Umsitingin ásannar, at broytingar av galdandi byggisamtykt krevja gjølla viðgerð, harímillum móttiknu viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini. Umsitingin viðmælir tó, at verandi uppskot, sum er lýst í hesum málinum, verður lagt fyri býráðið og síðani til almenna hoyring. Í hoyringstíðarskeiðnum verður almennur borgarafundur fyriskipaður á Velbastað, soleiðis at borgarar kunnu fáa neyðugt innlit í málið, og síðani viðmerkja. Á henda hátt verður møguleiki at samla so nógvar viðmerkingar og sjónarmið sum gjørligt, áðrenn endaliga viðgerðin av málinum verður gjørd og møguligar dagføringar av uppskotinum verða gjørdar.

Hetta er sami leistur, sum hevur verið nýttur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktunum fyri Kirkjubø, Nólsoy, Hvítanes og Kaldbak.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 24. apríl 2025: Einmælt samtykt.

Ískoyti
Uppskotið lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 19. juni til 10. september 2025. Í hesum sambandi var kunnandi borgarafundur á Velbastað 3. september 2025. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið tvey hoyringarskriv (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot*). Niðanfyri er ein samanumtøka av viðmerkingunum og svar frá umsitingini.

Mótmæli frá Dánjal Paula í Búðini, Ólavi Brimnes og Sveini Zachariasen umboðandi part av staðbundnu nevndini:

1. Frámælt at 5 F økir (alment frítíðarøki) verða broytt til D2 (almennar stovnar)

Í galdandi byggisamtykt er munur á F-økið, (almenn frítíðarøkið) og E-økið (almennir stovnar). Í nýggja uppskotinum eru øll F-økini broytt til D2 (almennar stovnar, ítrótt, mentanarlig endamál v.m.). Hetta verður mett at vera óheppið og óhóskandi fyri fleiri av økjunum (ítøkiliga verður víst á 5 økir), og áttu hesi økini ístaðin fyri at verið broytt til D1 (frílendi), soleiðis at tey verða varðveitt sum frílendi. Sambært skrivinum eru økini í dag virðismikil náttúruøkið sum børn og onnur hava gleði av, og er ynskið at tey vera varðveitt til hetta endamálið.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Ætlan er ikki at staðseta almennar stovnar í teimum 5 F-økjunum, sum víst verður til í hoyringsskrivinum. Umsitingin er tískil samd í, at D1 er hóskandi áseting fyri hesi økini, og verður uppskotið tillagað sambært tilmælinum.

2. K-økið (Landbúnaður) verður broytt til 4. grundumráði

Mett verður, at tað ikki er rætt at broyta galdandi K-økið til 4. grundumráði. Orsøkin er at ásetingar fyri 4. grundumráði víðka um heimildirnar fyri hvat kann byggjast uttan fyri bøgarðarnar. Í nýggja uppskotinum verður 4. grundumráði lýst soleiðis:

"4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.",

Orðið "tílikt" kann boyggjast í mun til hvør lesur tað, og funnist verður somuleiðis at hesi orðing:

"Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði."

Mælt verður til, at halda seg til verandi áseting sum er galdandi fyri K, har tað er greitt at umráðisparturin er lagdur til landbúnað.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin er samd í, at heimildin fyri nýtslu í 4. grundumráði er sera breið og tískil ikki lýsir nágreiniliga, hvat kann og hvat ikki kann byggjast. Munur er eitt nú á landbúnaðarvirksemi, smærri bygging í sambandi við ferðavinnu og vindmyllur, sum er alt virksemið sum sambært byggisamtyktini kann rúmast í umráðispartinum.

Tó verður mælt frá at varðveita ásetingarnar fyri K-øki í haganum kring Velbastað. Orsøkin er, at nýtslan í galdandi áseting somuleiðis er breið, og ein varðveitan av økispartinum K stríðir ímóti endamálinum um, at ásetingar, sum í størri mun samsvara við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og hinar bygdirnar í kommununi, skulu vera eins. Um hagin kring Velbastað hevur aðrar ásetingar enn hagin kring aðrar bygdir í kommununi, verður hetta í fyrstu atløgu umsitingarliga fløkjasligt at umsita og at dagføra í eini heild.

Mælt verður til, at umsitingin í nýggjum máli fer undir at lýsa og nágreina nýtsluna í 4. grundumráði í síni heild fyri alla kommununa, sambært eini lendisætlan. Í hesum málinum skulu viðmerkingarnar í sambandi við 4. grundumráði í hesum málinum, takast til eftirtektar.

3. Víðkan av D1 økinum við Mýandalsá

Í galdandi byggisamtykt er økið við Mýandalsá H: Frílendi broytt til D1: Frílendi. Í broytingaruppskoti verður mælt til at víðka hetta økið norðureftir.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Mett verður, at náttúruvakra økið fram við ánni hóskar sum D1 frílendi, og er nýtt uppskot gjørt, har D1 økið er víðkað norðureftir sambært broytingaruppskotinum.

Í mótmæli við 78 undirskriftum:

1. F-økini skulu broytast til D1 heldur enn D2.

Eins og í viðmerking 1 verður víst á, at fleiri D2 økir sambært uppskotinum, høvdu hóskað betur sum D1 økir.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Vísandi til viðmerking 1 hevur umsitingin gingið hesi viðmerking á møti.

2. Bústaðarøki sunnanfyri Mýandalsá

Bústaðarøki sunnan fyri Mýandalsá (á matr 50a) er alt ov tætt við ánna og fossin, og eigur at verða minkað tilsvarandi, soleiðis at tað lýkur krøvini um frástøðu frá áum og fossum, og verður partur av D1 øki.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Stóra óbygda byggiøkið hevur mark við ánna, og hevur umsitingin í uppskoti rættað markið, soleiðis at byggiøkið verður flutt frá ánni eftir marki, sum verður mett hóskandi. Harafturat hevur umsitingin broytt E øki (almennur stovnur) til A øki, av tí at ongin útstykkingarætlan er fyri økið, og harvið er ikki greitt, júst hvar ein møguligur stovnur hevði hóskað seg, um tað eina ferð í framtíðini verður ústykkjað.

3. Mint verður á orðing í samanleggingarsáttmálanum millum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu

Orðingin er soljóðandi:
"Kirkjubøur og Velbastaður verða varðveittar sum bóndabygdir og koma at bera dám av hesum. Dyrkað jørð, bæði innan og uttangarðs, eigur í hesum sambandi, í mest møguligan mun, at verða varðveitt sum landbúnaðarjørð. Fyrilit skal vísast fyri dyrkbærum lendi, sum, í mest møguligan mun, eigur at verða arðveitt sum lendi, ið kann dyrkast."

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Henda orðing hevur týdning fyri byggisamtykt, í mun til hvørt langtíðarendamálsynski er um at røkka, og mælir umsitingin til, at orðingin, frá samanleggingarsáttmálanum verður varðveitt undir innleiðandi brotinum «Endamál» í uppskotinum um byggisamtykt fyri Velbastað.

4. K økið skal varðveitast

At enda verður, eins og í viðmerking 2, staðiliga mælt til, at § 10, áseting fyri 4. grundumráði skal strikast.

Trupulleikin við ásetingum fyri 4. grundumráði er, at møguliga nýtslan í økispartinum er víðopin, Víst verður til málið um matstovu/gistingarhús við Fossdalsgjógv, tá ið Tk gjørdi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv vísandi til, at allar bygdir í Tórshavnar kommunu vóru í 4. grundumráði. Hetta hevði TK, sambært mótmælinum ikki heimild til, tí at byggisamtyktin fyri Velbastað er galdandi og harvið øki K.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar, sum umsitingin hevði til pkt. 2 í fyrra hoyringsskrivinum.

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið um endurskoðan av Kaldbak og Kirkjubø, og hevur umsitingin í hesum sambandi gjørt fylgjandi broytingar í sambandi við endurskoðanina av Velbastað:
1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III § 3).

Nýggj skjøl
j.nr. 25/01104-13 Kort – Velbastað eftir broyting, nov 2024
j.nr. 25/01104-11 Viðmerkingar og broytingaruppskot
j.nr. 25/01104-12 Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025
j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin fyri Velbastað, uppskot des 2025
j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin Velbastað uppskot des 2025 – við markeraðum broytingum

Tilmæli
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at stovna mál, har farið verður undir at broyta ásetingar fyri 4. grundumráði fyri alla kommununa, har viðmerkingarnar í hesum málinum vera nærri viðgjørdar

Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 29. januar 2026: Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

Ískoyti
Býráðið samtykti at beina málið aftur í nevnd.
Viðgerðin í býráðnum vísti á, at møgulig broyting av galdandi K øki (landbúnaður) til 4. grundumráði, kann gerast óheppin, tá tað í verandi løtu ikki er greitt hvussu dagførdu ásetingarnar fyri 4. grundumráðið verða orðaðar, og tá tað í dag er møguligt við serstakari byggisamtykt at loyva øðrum virksemið í hesum økisparti.

Arbeiðið at dagføra byggisamtyktirnar fyri bygdirnar handlar um at gera eins ásetingar fyri allar bygdir. Býarskipanin fyri kommununa er soleiðis skipað, at ymiskar ásetingar eru galdandi fyri bygda økið, meðan hagin millum bygdir og bý er í økispartinum 4. grundumráðið.

Umsitingin metir at ásetingar fyri 4. grundumráði sambært uppskotinum eru hóskandi, tí hóast tær eru lutfalsliga víðfevnandi, so verður verandi landbúnaðarvirksemi kring bygdirnar varðveitt, umframt at møgulig umsókn um broytta nýtslu, í samb. við t.d. bygging av vindmyllum, grótbroti ella matstovu/gistingarhúsi, skal til politiska viðgerð, almenna hoyring og góðkennast av landsmyndugleikum, áðrenn tílík broyting verður galdandi.

Um umsitingin, í samband við endurskoðanina av Velbastað, skal fremja eina meira nágreinandi býarplan fyri nýtslu í haganum kring Velbastað nú og í framtíðini, er hetta arbeiðið at meta sum ein yvirskipaða lendisætlan, og hóast tað verður mett neyðugt at fremja, fer tað sannlíkt at seinka málið um endurskoðan munandi.

Umsitingin hevur tískil 3 møguleikar:

- At varðveita K økið (verandi áseting)
- At broyta til K til 4. grundumráði (sambært uppskotinum)
- At gera eina lendisætlan fyri hagan kring Velbastað.

Av hesum møguleikum mælir umsitingin til at halda fast í uppskotinum, har verandi K øki verður broytt til 4. grundumráði, grundað á áðurnevnda aðalmál, um at javnstilla byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu, og tí at ásetingin fyri 4. grundumráði varðveitir verandi nýtslu, og krevur serstaka byggisamtykt, sum skal ígjøgnum drúgva tilgongd, um annað virksemið skal loyvast í hesum økispartinum.

Aðrar viðmerkingar frá umsitingini
Umsitingin hevur í málinum um byggisamtykt fyri Kirkjubø móttikið viðmerkingar frá Búnaðarstovuni og Bóndafelag Føroya, sum vísa á eina avmarkandi ávirkan, um H frílendi (frílendi) í bygdini, sum bæði í Kirkjubø og á Velbastað er galdandi fyri innangarðsjørð, verður broytt til D1-frílendi. Orsøkin er at D1 ásetingar ikki nevna at økið verður tilskilað landbúnðarvirksemi. Umsitingin mælir tí til at broyta býarplanin soleiðis at H økini í Velbastað (og Kirkjubø) vera broytt til 4. grundurmáði (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*).

H1 økið, sum sambært galdandi byggisamtykt er lagt til friðað øki av mentunar- og søguligum grundum, verður sambært uppskotinum broytt til D1 øki, og á tann hátt lýsir byggisamtyktin meira nágreiniliga hvørji økir í bygdini hava serligt fornfrøðiligt ella varðveitingarvert virði.

Nýggj skjøl
j. nr. 25/01104-16 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026

Tilmæli
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026: Anja Weyhe og Annita á Fríðriksmørk taka undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen og Kári Johansen taka ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 19. mars 2026: Atkvøtt varð um tilmæli frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen,Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ískoyti
Av misgáum var ikki samsvar millum málslýsing og viðhefta kortskjal til seinastu viðgerð. Ítøkiliga er talan um broytingaruppskotið, sum umsitingin gekk á møti, har F økir vera broytt til D1. Umsitingin hevur tískil viðheft nýtt kortskjal, har feilurin er rættaður (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026)*.

Nýggj skjøl
j. nr. 25/01104-19 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026

Tilmæli
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026: Ein minniluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Tikið av skrá.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 11. juni 2026: Útsett til næsta fund.

Ískoyti:
Uppskotið lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 19. juni til 7. august 2026. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið eitt hoyringarskriv (sí skjal *Mótæli viðv. endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*).

Í mótmælinum verður endurtikið, at 4. grundumráði skal strikast. Orsøkin er, sum áður nevnt, at umráðisparturin verður lagdur til «landbúna og alment frílendi og tílíkt», og at hendan orðingin loyvir alt ov víttfevndandi nýtslu. Ítøkiliga verður víst á orðingina «smærri bygging í sambandi við ferðavinnu v.m.», og at hetta stríðir ímóti samanleggingarsáttmálanum, sum staðfestir, at Velbastaður skal varðveitast sum bóndabygd.

Umsitingin hevur viðgjørt hesar somu atfinningar og er framvegis av tí fatan, at umráðisparturin hóskar til landbúnaðarvirksemi eins og aðrastaðni í kommununi. Sum áður nevnt, krevur bygging í 4. grundumráði, at nýggj serstøk byggisamtykt verður gjørd, og skal hendan bæði til politiska viðgerð og almenna hoyring.

Umsitingin metir, at tað er skilabetri at endurskoða ásetingar í 4. grundumráði í síni heild og út frá eini lendisætlan fyri uttangarðsøkir í allari kommununi, og at hendan viðgerðin skal fremjast í øðrum máli. Mælt verður til at halda fast við uppskotið.

Nýggj skjøl
j. nr. 25/01104-26 - Mótmæli viðv. endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

Tilmæli
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum og beina málið í býráðið.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 07. september 2026: Kunnað varð um málið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Ein minniluti, Anja Weyhe og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

278/26 Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri kaldbak, matr. nr. 49m

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	31.08.2026	181/26	26/03252-5
2 Býráðsfundur	22.10.2026	278/26	26/03252-5

Upprunin til málið
8. apríl 2026 sendu eigarar av matr. nr. 49m, Kaldbak, umsókn um byggisamtyktarbroyting vestan fyri teirra ogn (sí *Umsøkn um broyting av almennu byggisamtyktini fryi Kaldbak)*.

Lýsing av málinum
Grundstykkið er við endan á vegnum Á Kongsjørð, har nýggj útstykking er til seks sethús. Eigarar ynskja, at byggisamtyktin fram við ánni verður broytt frá landbúnaðarendamálum til sethúsaøki, soleiðis at tey kunnu keypa lendið og leggja afturat matr. nr. 49m. Hetta gevur eigarum møguleika at byggja egnan garð sum kann verja ogn móti oyðilegging frá ánni.

Eigarar vísa á, at matrikkulin hevur friðað øki inni á ognini, sum avmarkar møguleikar fyri útbygging. Í málinum *Nýggja útstykking matr. nr. 49m, Kaldbak 25/01135* staðfestir Fornminnisnevndin at friða smiðjutoftirnar, tí at hesar siga frá søguligum virksemi, sum var á staðnum um ár 1800. Úrslitið varð, at upprunaliga útstykkingin Á Kongsjørð broyttist og semja varð um, at eigari av matr. nr. 49m kundi økja víddina á grundstykkinum, soleiðis at grundøkið er 573 m^2, og friðaðu toftirnar eru inni á hesum grundstykki. Hini grundstykkini Á Kongsjørð eru áleið 432m^2.

Umboð frá býarskipanardeildini var á ástaðarfundi 18.06.2026, har hugt var nærri eftir umstøðunum.

Eigari greiddi frá, at til tess at fyribyrgja, at áin floymir yvir á hansara ogn um veturin, og at byggja ein garð, er tað mest einfalt, um hann kann økja víddina á stykkinum yvir móti ánni. Sambært eigara av matr. nr. 49m er bóndin sinnaður at selja part av stykkinum, og eigarin ímyndar sær somuleiðis, at húskið fer at uppihalda seg í hesum útiøkinum, óansæð eigaraviðurskiftir.

Lógir, ásetingar o.a.
Galdandi ásetingar eru sambært Serstøku byggisamtyktini fyri Kaldbak

1. Høvuðsøkið
   Økið, sum kemur undir hesa byggisamtykt verður kannað búnaðarendamálum, har loyvt er at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við landbúnaðin at gera.

a. Eindirnar A. Sethúsabygging
1. Økið skal einans verða nýtt til sethús, og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg og við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi.
2. Á økinum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við royki, gangi ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða teimum, sum uttanum búgva til ampa.

Málið tekur tó útgangstøði í endurskoðanini, sum ikki er galdandi, men har ásetingar fyri sethúsaøkið A sambært uppskotinum eru soljóðandi:

> § 2. Ásetingar fyri umráðispart A
> 1) Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2) Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3) Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av tvíhúsum.

4) Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

5) Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

6) Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús.

7) Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8) Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9) Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta
punkt við útvegg.

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin hevur viðgjørt málið, og metir, at loysnir kunnu finnast, sum verja húsini móti vatni innan fyri galdandi byggisamtykt og eigaraviðurskifti. Býarskipanarliga verður mett hóskandi, at geirin framvið ánni ikki gerst privat ogn. Ein møgulig ummatrikkulering hevði økt um støddina á matr. nr. 49m, soleiðis at lutfallið við hini sethúsini í økinum hevði blivið skeiklað, og við galdandi byggi- og nýtslustigi hevði hetta skapað eina ójavna heild. Út frá hesum verður mælt frá at ganga umsóknini á møti.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak - 22/04935, journal nr. 25/01096
Nýggja útstykking matr. nr. 49m, Kaldbak - 22/01139 - 25/01135
Nýggja útstykking matr. nr. 49m, Kaldbak - 22/01139

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
- *Umsøkn um broyting av almennu byggisamtyktini fryi Kaldbak j.nr. 25/01096-1*

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini frá at broyta part av matr. nr. 49a fram við ánni eystan fyri útstykkingina Á Kongsjørð til bústaðarøki og beina málið í býráðið.

Frámælið er grundað á, at:

- tað verður mett hóskandi, at privatu matriklarnir varðveita eina frástøðu frá ánni,
- húsini kunnu verjast móti ánni uttan at at broyta eigaraviðurskiftini,
- og matr. nr. 49m fer í ov stóran mun at víkja frá í støddd í mun til restina av útstykkingini

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti
Eftir at hava umbiðið innlit í samtyktina í Byggi- og býarskipnarnevndini, vendi umsøkjari sær til kommununa 15. september, og spurdi um nýggjan ástaðarfund. Endamálið við fundinum var at greiða nærri frá sjónarmiðinum, áðrenn málið fór til viðgerðar í býráðnum. Á ástaðarfundi 7. oktober (sí *Fundarfrágreiðing - 49m, Kaldbak*) førdi umsøkjari fram hesi sjónarmið:

- Tørvur er á at gera garð út móti ánni, sum tíðum loypir.
- Óhent skap á grundøki. Lutir á ognini eru friðaðir, og hetta ger somuleiðis, at byggimøguleikarnir eru avmarkaðir.
- Um til bar at keypa lendið afturat, er lættari at byggja ynsktu húsini.
- Ynskta lendið er lendið, sum umsøkjari hóast alt hevði nýtt, so ella so.
- Festarin av matr. nr. 49a hevur játtað keypið.
- Bygdarfólk annars tykjast ikki vera ímóti keypinum.

Eftir at fundarfrásøgnin varð send umsøkjara til ummælis viðmerkti umsøkjari (sí *SV_ Fundarfrágreiðing - 49m, Kaldbak)* at høvuðsendamálið við umsóknini er at fáa eina betri staðseting av húsinum, og at grundøki hevur eitt óhent skap, og at friðaðu toftirnar avmarka byggimøguleikarnar. Endamálið við at keypa lendið fram við ánni er eisini at fáa eina betri heildarloysn viðvíkjandi húsinum, verju móti ánni og uttanumøkinum, og er umsøkjari opin fyri at avmarka byggirættin, so at víðkanin av grundøkinum ikki gevur møguleika at byggja eitt størri hús.

Hóast umsøkjari hevur ført síni sjónarmið fram, so mælir umsitingin framvegis til at halda fast í tilmælinum um ikki at broyta byggisamtyktina, sambært hesi grundgeving:

- Útstykkingin og byggisamtyktin er trekt uml. 5 m frá ánni. Hetta er tilvitað og nakað man generelt ger í kommununi fyri at verja áir, og soleiðis at hesar atkomuligar hjá øllum borgarum.
- Ynskiligt er, at ein gøta einaferð í framtíðini verður gjørd framvið ánni, fyri at gera eina farðleið millum býling "Á Gørðum" og oman í miðstaðarøkið, har skúlin og ítróttarhøllin er staðsett.
- Garður at verja móti ánni kann eins væl gerast inni á verandi grundstykki.
- Stykkið er frammanundan vaksið, grundað á friðaðu lutirnar, og mett verður, at til ber at byggja eini hóskandi hús á ognini. Matrikkulin er 573 fermetrar, meðan hini grundstykkini eru 432 fermetrar til støddar.
- Stykkið er frammanundan uml. 140 m^2 størri enn hini grundstykkini í útstykkingini. Stóri víddarmunurin kann skeikla javnvágina í útstykkingini og ger, at húsini á matr. nr. 49m kunnu gerast munandi størri, enn hini húsini. Um ognin gerst størri, veksur hesin munurin.

Mælt verður sostatt til, at halda fast í tilmælinum, ið Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 31. august 2026, og er er hetta grundað á at ongar nýggjar upplýsingar eru komnar til málið, sum hava týdning fyri avgerðina.

Nyggj skjøl

- *Fundarfrágreiðing - 49m, Kaldbak, j.nr. 26/03252-11*
- *SV_ Fundarfrágreiðing - 49m, Kaldbak, j.nr. 26/03252-11*

Tilmæli:
Víst verður til tilmælið, sum varð lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Elsa Berg boðaði frá, at hon var ógegni og fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini 31. august 2026, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, tvær atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen

279/26 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	10.06.2025	107/25	25/06231-2
2 Tekniska nevnd	10.06.2025	42/25	25/06231-2
3 Fíggjarnevndin	12.06.2025	108/25	25/06231-2
4 Býráðsfundur	18.06.2025	155/25	25/06231-2
5 Byggi- og býarskipanarnevndin	21.11.2025	182/25	25/06231-2
6 Fíggjarnevndin	03.12.2025	226/25	25/06231-2
7 Býráðsfundur	11.12.2025	277/25	25/06231-2
8 Byggi- og býarskipanarnevndin	13.04.2026	87/26	25/06231-2
9 Býráðsfundur	30.04.2026	120/26	25/06231-2
10 Kollafjarðarnevndin	09.06.2026	8/26	25/06231-2
11 Býráðsfundur	05.05.2026	153/26	25/06231-2
12 Byggi- og býarskipanarnevndin	31.08.2026	185/26	25/06231-2
13 Byggi- og býarskipanarnevndin	07.09.2026	198/26	25/06231-2
14 Býráðsfundur	17.09.2026	253/26	25/06231-2
15 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	205/26	25/06231-2
16 Fíggjarnevndin	07.10.2026	194/26	25/06231-2
17 Býráðsfundur	22.10.2026	279/26	25/06231-2
18 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	229/26	25/06231-2
19 Kollafjarðarnevndin	27.10.2026	20/26	25/06231-2

Upprunin til málið
Hetta mál er framhald av máli nr. 21/02624, Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.
Gamla málslýsingin sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c.*

Lýsing av málinum
Matr. nr. 203c bleiv í 2021 boðin út til raðhúsa- og/ella íbúðarbygging. Eitt tilboð varð móttikið, og varð tað samtykt at selja tilboðsveitara stykkið til raðhúsa- og íbúðarbygging. Men samráðingarnar rukku ikki á mál, og tí varð tilboðið avlýst.

Síðani varð økið boðið út í tveimum umførum í 2022, men grundað á, at eingi tilboð komu inn, varð samtykt at skipa økið til sethús, umframt at keypa nakað av lendi frá grannaognunum, soleiðis at sethúsaútstykkingin kundi skipast við grundstykkjum á 400 fermetar. Samráðingarnar við grannaognirnar komu væl ávegis, og økið varð boðið út til sethús.

Kommunan móttók tvey tilboð upp á at gera útstykkingina. Hallur Hansen, entreprenørur sp/f, vann útboðið, men grundað á, at kostnaðurin á sethúsastykkjunum gjørdist ov høgur, varð samtykt í býráðnum, at selja grundstykkini fyri kr. 500.000 pr. stk, og at játta kr. 2.500.000 fyri at fíggja írestandi fígging, sum kom at mangla í.

Kommunala eftirlitið tók málið upp og kom til ta niðurstøðu, at kommunur ikki kunnu fara undir útstykkingar, um tað frammanundan er greitt, at útstykkingin ikki kemur at hanga saman fíggjarliga og tær tí koma at áleggja skattgjaldaranum eyka útreiðslur

Samtyktin í býráðnum er tí ikki í samsvari við niðurstøðurnar frá kommunala eftirlitinum. Av hesi orsøk verður mælt til, at útboðið verður annullerað, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum mótvegis Tórshavnar kommunu, og møguligt endurgjald veitt honum í hesum sambandi.

Á várið 2025 varð arbeiðsbólkur settur at vísa á 7-10 átøk, sum kunnu gera sítt til at fremja málið um, at fleiri bústaðir verða bygdir komandi árini. Í hesum arbeiðinum lýsti átak E, at kommunur skuldu fáa loyvi til partvís at rinda fyri byggibúning. Tí verður mælt til, at farið verður aftur til upprunaætlanina við økinum, og harvið undir enn eina roynd at bjóða matr. nr. 203c út til bygging av raðhúsa- og/ella íbúðarbygging, har kommunan antin áðrenn ella samstundis luttekur í at skipa og gera vegin í økinum.

Lógir, ásetingar o.a.
Nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, tá ætlanin fyri økið er góðkend, og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast.

Upplýsingar frá umsitingini
Málið eigur at verða lagt fyri staðbundnu nevndina í Kollafirði til kunningar, tá tað er samtykt í býráðnum.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
-

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
-

Skjøl
j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei
Í núverandi støðu eru ongar fíggjarligar avleiðingar av málinum.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verandi útboð til sethúsaútstykking verður avlýst, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum og møguligt endurgjald verður latið.
- At nýtt útboð fyri matr. nr. 203c verður skipað til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tekniska nevnd 10. juni 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan.

Fíggjarnevndin 12. juni 2025: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Býráðsfundur 18. juni 2025: Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at gjørdar verða keypsavtalur við ognararnar av matr. 209a, 308 og 309, og at játta upp til kr. 410.000 alt eftir endaligu fermetrunum íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022 útstykking Lygnnes.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Ískoyti:
Samráðingar hava verið við ymisku eigararnar av lendi niðanfyri matr. nr. 203c, Kollafjørður.

Viðvíkjandi matr.nr. 308
Søla av uml. 68 m², sum verður lagt afturat matr.nr. 308.
Keyp av uml. 418m², sum verður lagt afturat matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: netto 350 m² x 350 kr/m² = 122.500 kr.
Samstundis søkir eigari av matr.nr. 308, um sundurbýti av einum grundstykki á 500 m^2 burturav matr.nr. 308.

Viðvíkjandi matr. nr. 309
Keyp av uml. 971 m² av matr. nr. 309, sum verður lagt saman við matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: 971m² x 350 kr/m² = 339.850 kr.

Samlaður netto keypsprísur: 122.00 kr + 339.850 kr = **462.350 kr.**

Neyðugt verður harumframt at leggja upp fyri útreiðslum til matrikulering og tinglýsing v.m., mettar útreiðslur.

Leyslig útrokning av kostnaði til matrikulering:

Grundgjald	4.000,00
3. frábýttir lutir (3.000 x 3) =	9.000,00
Gjald fyri virði 2 % av 1.427 m² á 350 kr. m² =	9.989,00
Tilsamans	22.989,00

Tinglýsingargjald:
Tinglýsing: 1 % + kr. av hvørjum skeyti

Torført er at meta um, hvussu hetta ítøkiliga málið verður avgreitt, men talan verður helst um 3 skeytir.

Samlaður mettur keypsprísur 462.350,00 kr. x 1 % = 4.623,50 kr.+ 3.000 kr. = 7.623,50 kr.

Samlaður mettur kostnaður verður hereftir uml. **492.962,5 kr.**

Møgulig onnur sakargjøld og møguligar endaligar víddir kunnu víkja frá, og verður tí søkt um at fáa eina fígging til vega á kr. 500.000 til avgreiðslu av hesum málinum.

Á býráðsfundinum 18. juni varð samtykt at játta upp til kr. 410.000, alt eftir endaligu fermetrunum, íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes. Nú tá samráðingarnar eru komnar á mál, so er tørvur á nakað hægri fígging til at fremja endaliga keypið. Sí journal nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*, sum sýnir, hvat ítøkiliga keypið fevnir um.

Skjøl
Journal.nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*

Tilmæli
Kommunustjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at hækka játtanina til keyp av lendinum við kr. 90.000 á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025: Samtykt at játta kr. 200.000 til at fremja keyp av matr.nr. 308, 309 og 209a á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 03. desember 2025: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winher Poulsen, tekur undir tilmælinum og beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

Býráðsfundur 11. desember 2025: Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

Ískoyti
Á býráðsfundi 18. juni 2025 varð samtykt, at nýtt útboð fyri matr. nr. 203c í Kollafirði skal skipast til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.

Umsitingin hevur síðani arbeitt víðari við málinum. Samráðingar hava verið við nærmastu grannar, soleiðis at partar av teirra lendi er keypt og yvirtikið, og kann lendið sostatt verða partur av útbjóðingini.

Nýtt útboðstilfar er gjørt, sum leggur upp til, at partar av matr.nr. 203c, 308 og 209, uml. 5.772 m², verður boðið út til bústaðarbygging við íbúðum og/ella raðhúsum samsvarandi samtyktini hjá býráðnum. Sí skjal nr. *25/06231-30 Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026*.

Dentur verður lagdur á eina bústaðarbygging við góðari dygd, hóskandi býti millum rað- og íbúðarbygging og eigaraviðurskifti, samstundis sum kommunan tryggjar, at bústaðirnir í størstan mun koma røttum málbólki til gagns.

Skjøl:
Skjal nr. 25/06231-30 *Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026*

Tilmæli
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- *Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026,* til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum, skjal nr. 25/0623-30, verður samtykt,
- at umsitingini verður heimilað at bjóða økið út samsvarandi hesum
  at málið verður beint í býráðið

Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Atkvøtt varð um tilmæli í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddi: og Annfinn Brekkstein.

Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026: Kunnað varð um málið.

Ískoyti
Tá freistin at lata tilboð inn var farin, var eitt tilboð innkomið. Tilboðið var frá HVT, og umsitingin hevur havt fund við felagið um innlatna tilboðið.
HVT vísti á, at tað hevur stóran týdning fyri felagið at sleppa skjótt undir bygging og sølu. Eftir fundin avgjørdi HVT tí at trekkja tilboðið aftur, tí mett varð, at neyðuga tilgongdin við broyting av byggisamtyktini og eftirfylgjandi tilgongdin við byggimálsviðgerð fór at taka ov langa tíð.
Á fundinum vísti HVT tó áhuga fyri at keypa økið og byggja lyklaklár sethús samsvarandi galdandi byggisamtykt (sí skjal 25/06231-43 kort 'Áðrenn broyting').

Av tí at eingi onnur tilboð komu inn, mælir umsitingin til at arbeiða víðari við einum leisti, har økið verður boðið út til sethúsabygging. Fyri at skapa møguleika fyri so nógvum bústaðareindum sum gjørligt á økinum verður samstundis mælt til at broyta byggisamtyktina fyri útboðsøki frá A1-øki til A4-øki (sí skjal 25/06231-43 kort 'Eftir broyting). Útboðsøki er tað økið, sum upprunaliga bleiv boðið út til rað- ella/og íbúðarbygging, og tað økið, sum kommunan hevur samrátt seg til at keypa (sí skjal 25/06231-27 umsókn um sundurbýti).

A4-ásetingarnar loyva sethúsakendari bygging, sum kann býtast sundur í fleiri sjálvstøðugar bústaðareindir. Byggingin í hesum umráðispartinum er at sammeta við sethúsa- og tvíhúsabygging, men loyvir fleiri bústaðareindum fyri betri at gagnnýta avmarkaða lendið. Skipanin av tílíkum økjum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

<u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>
Av tí at økið nýliga hevur verið boðið út, so verður mett, at tað er hóskandi at stytta innlatingarfreistina, soleiðis at greiða fæst skjótt á, um áhugi er at byggja á lendinum. Vanliga liggur boðið úti í uml. 4-6 vikur, í hesum førinum verður mælt til at stytta freistina niður í 2-4 vikur.

Útbjóðingartilfarið verður tillagað, soleiðis at økistreytirnar verða broyttar til, at byggingin skal halda seg til ásetingarnar fyri umráðispartinum A4 í almennu byggisamtyktini. Annars verða treytirnar tær somu, sum seinast økið varð boðið út.

Lógir, ásetingar o.a.
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Ásetingar fyri A4 øki smb. uppskoti til broyting av almennu byggisamtykini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.
- Skipanin av økinum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

Nýggj skjøl
25/06231-43 Áðrenn broyting
25/06231-43 Eftir broyting
25/06231-27 umsókn um sundurbýti

Tilmæli
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla nevndini til:
- at heimila umsitingini at fara undir broyting av byggisamtykt fyri útboðsøkið frá A1-øki til A4-øki (sí kort).
- at bjóða økið út av nýggjum við einari lutfalsliga stuttari útboðsfreist (2-4 vikur) til sethúsakenda bygging, sum kann býtast sundur í fleiri sjálvstøðugar bústaðareindir.
- og at beina málið beint í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026: Útsett.

Byggi- og býarskipanarnevndin 07. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 17. september 2026: Anja Weyhe legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at kortið verður broytt, soleiðis at kortið A4 eisini fevnir um partar av matr. nr. 209a og ein størri part av matr. nr 308, sambært skjalinum, *Kort – Eftir broyting, 17.09.2026*.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Uppskotið samtykt soleiðis broytt.

Ískoyti:
Býráðið samtykti 20. juni 2024 at játta kr. 7.000.000 sum útlegg á nýggja verkætlan L64022, Útstykking til sethús á Lygnnesi.

18. juni 2025 samtykti býráðið, at útboðið til sethúsaútstykking varð avlýst, og at arbeiðstakarin varð loystur úr sínum skyldum og møguligt endurgjald varð latið. Harumframt samtykti býráðið, at bjóða økið út av nýggjum.

Av tí at sethúsaútstykkingin er avlýst, skal verkætlanina undir konto 6475, L64022, Útstykking til sethús á Lygnesi lokast, og útleggið strikast.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at verkætlanin undir *konto 6475, L64022, Útstykking til sethús á Lygnesi*, verður lokað og útleggið á kr. 7.000.000 verður strikað, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipannarnevndini og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Einmælt samtykt.

280/26 Broytan av prísum / takstum í Navision - graviloyvir o.a.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Tekniska nevnd	13.04.2026	45/26	26/01571-2
2 Fíggjarnevndin	09.09.2026	176/26	26/01571-2
3 Fíggjarnevndin	07.10.2026	197/26	26/01571-2
4 Býráðsfundur	22.10.2026	280/26	26/01571-2

Upprunin til málið
Rakstrarstøðin hjá teknisku deild stendur fyri dagliga rakstrinum innan tekniska økið. Fyri at fremja ymsu rakstrararbeiðini er neyðugt at útvega tilfar so sum asfalt, termoplast og skelti. Støðið á hvørjum rakstrartíma er grundaður á prísir fyri tilfar, arbeiðsløn og tímatakst fyri maskinu. Takstirnir, ið liggja í skipanini, eru rættiliga gamlir.

Eisini eru sera nógvir takstir at velja í, tað hevði so statt verið ynskiligt at fingið strikað fleiri takstir, samstundis sum ein prístalsregulering verður gjørd.

Lýsing av málinum
Arbeitt hevur verið við føstum prísum, og tørvur er á at fáa dagført hesar tímaprísir fyri at fáa javnvág í útreiðlsum og inntøkum á rakstrarstøðini.

Inntøkugrundarlagið á rakstrarstøðini er:
- 6810 (kloakk) Íbindingargjøld
- 8110 Ymisk smáarbeiði fyri aðrar deildir (t.d. snarliðini og lendisgøtur fyri býarskipanardeildina), henda kontan leggur út fyri tilfar, ið aðrar deildir brúka.
- 8111 (reinhald) Ofta umbiðið frá øðrum deildum, ella um ein privatur veitari hevur mist eitthvørt á vegin, so kann feiibilurin sendast út, og rokning verða send til eigaran.
- 8112 (asfalt) Verður serliga nýtt til at senda rokningarnar fyri graviloyvi, har asfaltliðið fer út og asfalterar, tá t.d. fjarhitafelagið, Net, SEV, vatnverkið, gøtuljós v.fl. hava grivið í vegakervinum hjá TK.
- 8113 (skelting og striking) Játtanin er nógv minkað í mun til undanfarin ár.
- 8114 (Vetrarhald)

Skjøl
Jnr. 26/01571-3 46-26-01571 Dagført yvirlit - broytan av prísum takstum í Navision – graviloyvi. Vørunummur og prísir.pdf

Tilmæli:
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á rakstrarstøðini mæla til at staðfesta framløgdu prístalsreguleraðu takstirnar sambært skjali Jnr. 26/01571-3 “46-26-01571 Dagført yvirlit - broytan av prísum takstum í Navision – graviloyvi. Vørunummur og prísir.pdf”.

Tekniska nevnd 13. apríl 2026: Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Kári Johansen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og biður um at fáa lagt málið um dagføring av gjøldunum fyri aftur fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur støðu, tá hann hevur fingið meira kunning.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

281/26 Pumpustøð á Hvítanesi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Tekniska nevnd	13.04.2026	49/26	26/01673-1
2 Fíggjarnevndin	22.04.2026	87/26	26/01673-1
3 Býráðsfundur	30.04.2026	115/26	26/01673-1
4 Hvítanesnevndin	11.06.2026	5/26	26/01673-1
5 Býráðsfundur	05.05.2026	148/26	26/01673-1
6 Tekniska nevnd	07.09.2026	82/26	26/01673-1
7 Fíggjarnevndin	09.09.2026	174/26	26/01673-1
8 Býráðsfundur	22.10.2026	281/26	26/01673-1

Upprunin til málið
Tørvurin á at betra um spillvatnshandfaringina í økinum kring Hvítanes, serliga við atliti at tí, at økið er nógv nýtt sum dyppistaður. Verandi loysn tryggjar ikki nøktandi reinsing og leiðing av spillivatni burtur frá økinum.

Lýsing av málinum
Málið snýr seg um at fyrireika og fremja eina verkætlan, ið fevnir um bygging av nýggjum pumpustøðum og nýggjum spillvatnsleiðingum.

Endamálið er at leiða spillivatnið burtur frá økinum og víðari til eina havleiðing, sum liggur longri sunnanfyri.

Við hesum verður miðað eftir at verja umhvørvið og tryggja, at báðar víkirnar við Hvítanes framhaldandi eru reinar og egnaðar til frítíðarendamál, serliga dypping.

Lógir, ásetingar o.a.
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin metir, at ein loysn við pumpustøðum er tann mest haldgóða og umhvørvisliga rætta loysnin, sum gevur betri stýring av spillivatninum, og er í samsvari við spillivatnsætlanina.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐
Til staðbundnu nevndina til kunningar.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
6875	LK68999	Kloakkir

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
6875			Pumpustøðir á Hvítanesi

Upphædd
1.770.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan

Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.
- at játta kr. 1.770.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Pumpustøðir á Hvítanesi" undir konto 6875.
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og til staðbundnu nevndina til kunningar.

Tekniska nevnd 13. apríl 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 22. apríl 2026: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Atkvøtt varð um broytingaruppskot um at taka undir við teknisku nevnd, at beina sáttmálan aftur í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina til avgerðar, og at tekniska nevnd fær innlit í alt útboðið, ið varð einmælt samtykt.

Hvítanesnevndin 11. juni 2026: Kunnað varð um málið.

Ískoyti
Í sambandi við prosjekteringina er komið fram til, at tørvur er á at seta eitt felags reinsiverk fyri gomlu bygdina. Hetta kemur at viðføra ein meirkostnað í mun til fyrru metingina, sum varð løgd fyri teknisku nevnd 13. apríl 2026.

Skjøl
Jnr. 26/01673-9 Spillivatnspumpur á Hvítanes - støðulýsing og broyting

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
6875	LK68999	Kloakkir

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
6875			Pumpustøðir á Hvítanes

Upphædd
2.100.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	2.100.000

Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	25.000

Fíggjarligt rúm er fyri samlaðu verkætlanini innan løgukarmin á kloakkum LK68999 fyri 2026.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodna licitatión til 4 arbeiðstakarar.

Kunnað verður annars um gongdina í málinum.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út í innbodna licitatión.
- at játta kr. 2.100.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Pumpustøðir á Hvítanesi" undir konto 6875.
- at heimila umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakaran við besta boði.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Tekniska nevnd 07. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Ein meiriluti Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Kári Johansen og Høgni Vilhelmsen, ynskir málið aftur í fíggjarnevndina og býráðið, tá tilboðini fyriliggja.

Ískoyti
Í sambandi við viðgerðini í fíggjarnevndini 09.09.2026 er komið fram til eina villu,har tað var upplýst, at talan var um játtan á 2,1 mió kr. Hetta talið er endaligi kostnaðurin fyri arbeiðið og sostatt skuldi heldur verið biðið um kr.330.000. Játtanin er innan ásettu játtunarkarminum LK68999 fyri kloakkir 2026.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
6875	LK68999	Kloakkir	6875	L68053	Pumpustøðir á Hvítanes		330.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	2.100.000
Áður játtað	Upphædd:	1.770.000
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026-2027
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	25.000

Tilmæli
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út í innbodna licitatión.

- at játta kr. 330.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á verkætlanina L68053 “Pumpustøðir á Hvítanesi” undir konto 6875.
- at heimila umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakaran við besta boði.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Sum viðmerking tekur býráðið til eftirtektar, at málið um samlaða játtanina á kr. 2.1 mío hevur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini, men at ein skrivivilla er komin fyri í málslýsingini viðvíkjandi fíggingini av verkætlanini. Samlaða fíggingin er kr. 2,1 mio.

Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at taka undir við málinum, men at beina málið aftur í teknisku nevnd og fíggjarnevnd til støðutakan, tá tilboðini fyriliggja, ið varð einmælt samtykt.

282/26 Útboð av hegning av girðingararbeiði í TK

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Náttúru- og umhvørvisnevndin	28.09.2026	60/26	26/07273-1
2 Fíggjarnevndin	07.10.2026	199/26	26/07273-1
3 Býráðsfundur	22.10.2026	282/26	26/07273-1

Upprunin til málið
Tórshavnar kommuna hevur javnan tørv á hegning og girðingararbeiði ymsastaðni í kommununi. Fyri at fáa eina einfalda, skjóta og skipaða mannagongd, tá tørvur er á slíkum arbeiði, verður skotið upp at bjóða arbeiðið út sum rammuútboð.

Lýsing av málinum
Ætlanin er at bjóða ein rammusáttmála út um levering, uppseting, umvæling og niðurtøku av hegni og portrum í Tórshavnar kommunu.

Rammusáttmálin skal fevna um tíðarskeiðið 1. november 2026 til 1. november 2028 við møguleika hjá kommununi at leingja sáttmálan í upp til eitt ár.

Arbeiðið fevnir m.a. um seyðahegning, nethegning, tráðhegning, pelar, portur, umvæling og uppstramman av verandi hegni umframt niðurtøku og burturbeining av gomlum hegni.

Kommunan tryggjar arbeiðstakaranum arbeiði fyri í minsta lagi kr. 200.000 um árið, og tá er tilfar ikki íroknað, men rammusáttmálin gevur annars ikki arbeiðstakaranum rætt til eina ávísa arbeiðsnøgd.

Tilboðini verða samanborin eftir eindarprísum og mettari nøgd. Sáttmálin verður latin tí tilboðsgevara, sum lýkur øll minstukrøv og hevur lægsta samanberingarprísin.

Lógir, ásetingar o.a.
Útboðið verður framt sambært Innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu, samtyktur 23. oktober 2025.

Arbeiðið skal harumframt lúka viðkomandi krøv um arbeiðsumhvørvi, trygging, lønar- og setanarviðurskifti, skatt, avgjøld og burturbeining.

Upplýsingar frá umsitingini
Hegning kann fíggjast av rakstri av konto 6611, Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk, har vit kunnu avseta t.d. kr. 400.000 um árið til hetta arbeiði.

Umsitingin metir, at ein rammusáttmáli kann gera bílegging og umsiting av hegningararbeiði einfaldari og skjótari. Samstundis fæst ein greiður prískarmur fyri tey arbeiði, sum kommunan javnan hevur tørv á.

Við at bjóða arbeiðið alment út á Útboðsportalinum hjá Tórshavnar kommunu verður møguleiki hjá einum breiðari bólki av fyritøkum og einstaklingum, sum hava førleika og áhuga í hegningararbeiði, at bjóða upp á arbeiðið. Umsitingin metir, at hetta kann økja um kappingina og harvið hava jaliga ávirkan á prísstøðið fyri hegningararbeiði hjá kommununi.

Kommunan tilskilar sær rætt til at gera arbeiði við egnum fólki og at bjóða størri ella serligar uppgávur út fyri seg.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Eingi.

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Ongar viðmerkingar fyriliggja.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
26/07273-2 leiðbeining í hvussu hegn skal setast upp í TK
26/07273-3 Prísark fyri hegn og girðingararbeiði

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið við at umvæla verandi hegn og seta nýggj hegn upp í Tórshavnar kommunu verður boðið út í almennari útbjóðing á Útboðsportalinum, og at rammusáttmáli verður gjørdur fyri eitt tvey ára tíðarskeið.

Náttúru- og umhvørvisnevndin 28. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Kári Johansen legði fram broytingaruppskot um at hava innbodna lisitatión har minst 10 aktørar verða bodnir við, ið fall við seks atkvøðum fyri, og sjey atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið í fíggjarnevndini, ið fall við við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

283/26 Tórshavnar havn - ISPS skipan á skansabryggjuni og eystaru bryggju

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Havnanevndin	29.09.2026	45/26	26/07279-1
2 Fíggjarnevndin	07.10.2026	200/26	26/07279-1
3 Býráðsfundur	22.10.2026	283/26	26/07279-1

Upprunin til málið
Útbyggingin av, og umskipanin av virkseminum á skansabryggjuni.

Lýsing av málinum
Sambært løgtingslóg um at verja havnir, sum kom í gildi í 2004, og tilhoyrandi kunngerð nr. 33 frá 2004, skulu havnir hava verndarætlanir, sum Landsverk, ið er myndugleikin á økinum, skal góðkenna. Ein týðandi partur av verndarætlanunum er, at havnirnar skulu hava atgongdarstýring til ISPS góðkendu havnaøkini, soleiðis at bert fólk og akfør við loyvi hava atgongd til hesi øki.

Í sambandi við útbyggingina av Skansabryggjuni, og at skipafeløgini hava flutt og umlagt sítt virksemi, er neyðugt at skipa ISPS-økið av nýggjum. ISPS-mørkini, koyrileiðirnar og innkoyringarnar verða øðrvísi enn áður, og tí er neyðugt, at øll portur verða útgjørd við somu atgongdarstýring, soleiðis at ISPS skipanin kann virka sum ein samanhangandi heild. Hetta hevur eisini við sær, at portur og stýringar á Eystaru bryggju mugu skiftast út. Harumframt er verandi ISPS-hegn og portrini, sum vórðu uppsett í 2004, í sera ringum standi, og verandi atgongdarstýringin (ADK) ótíðarhóskandi.

Á økinum á Molanum, har Smyril Line framyvir skal húsast, eru ISPS-hegn og portur við stýringum partur av verkætlanini *"Molin"*, sum fevnir um nýggja ferðafólkaterminalin hjá Tórshavnar havn, nýggjan tollbygning, landgongd og útøki. Útgerðin til ISPS-skipanina er lagað til ynskir og krøv hjá Tórshavnar havn. Ein grundleggjadi fortreyt undir sniðgevingini, sum er gjørd í samstarvi við veitarar í verkætlanini *"Molin"*, hevur verið, at endaliga ISPS-loysnin skal virka sum ein samanhangandi skipan fyri alt økið og sostatt eisini fevna um økið hjá Faroe Ship umframt Eystaru bryggju. Eisini skal atgongdarstýringin kunna tengjast saman við PORT skipanini, sum Tórshavnar havn frammanundan brúkar.
Samlaða loysnin við hegni, portrum og stýringum er tí longu løgd til rættis. Men sjálv veitingin í verkætlanini *"Molin"* fevnir tó bert um økið, sum Smyril Line skal húsast á, og ikki um økið hjá Faroe Ship og á Eystara bryggju.

Fyri at fáa samlaðu ISPS loysnina framda sum eina samanhangandi skipan, og innan rímiliga tíð og kostnað, metir Tórshavnar havn, at skilabesti framferðahátturin er hesin

- At hegn og portur verður byggiharraveiting, t.v.s. at Tórshavnar havn keypir hegn og portur v.m. beinleiðis frá framleiðara sambært tí uppskoti, sum longu er gjørt í.s.v. "Molin" verkætlanina.
- At grevstur, jørð- og betongarbeiðið og uppseting av hegn- og portrum verður projekterað og síðani boðið út í innbodna lisitatión til fleiri veitarar.
- At el-íbindingar, stýringar av portrum og atgongdarskipanin verður veitt av sama veitara, sum veitir hetta til verkætlanina "Molin".

Umframt hegn, portur, atgongdarstýring v.m., verður eisini neyðugt at at víðka um talið av vakmyndatólum í.s.v. ISPS skipanina, umframt at tørvur verður á meiri netútgerð (switchar o.t.), sum verður útvegað í gjøgnum KT-deildina hjá TK.

Lógir, ásetingar o.a.
Løgtingslóg nr. 11 frá 31. mars 2004 um at verja havnir
Kunngerð nr. 33 frá 25. mai 2004 um at verja havnir

Upplýsingar frá umsitingini

Á løguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2026 eru avsettar kr. 3,572 mió á P38 “Skipan av havnaøkinum”, ið eru ætlaðar serliga til ISPS skipan v.m.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Stjórin í Tórshavnar kommunu mælir til:

- At Tórshavnar havn fær heimild at keypa hegn og portur v.m. beinleiðis frá framleiðara sambært tí uppskoti, sum longu er gjørt í.s.v. “Molin” verkætlanina.
- At grevstur, jørð- og betongarbeiðið og uppseting av hegn- og portrum verður projekterað og síðani boðið út í innbodna lisitatión, sum verður at leggja aftur fyri nevnd til støðutakan
- At játtaðar verða kr. 3,572 mió. til keyp av hegni og portrum, projektering av jørð- og betongarbeiðnum, umframt til keyp av netútgerð og vakmyndatólum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Havnanevndin 29. september 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Kári Johansen legði fram broytingaruppskot um at minst 5 arbeiðstakarar verða bondir við í innbodnari lisitatión, viðvíkjandi punkt tvey um grevstur, jørð- og betongarbeiðið og uppseting av hegn- og portrum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

284/26 Keyp av matr.nr. 283a, Kollafjørður. Signabøur.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	07.10.2026	201/26	25/02775-9
2 Býráðsfundur	22.10.2026	284/26	25/02775-9

Upprunin til málið. Betri Banki bjóðar kommununi lendi til keyps fyri 2,6 mill. kr.

Lýsing av málinum.

Matr.nr. 51-283a, Kollafjørður. Signabøur.

Lendið omanfyri vegin. Tinglýst vídd 10.160 m², Kortvídd 10.218 m². Byggisamtykt A1.
Lendið niðjanfyri vegin. Tinglýst vídd 1.919. E. Neystaøki, og 4. Grundumráði.
Vídd til samans 12.137 m²
Sí kortskjal. 25/02775-10

Økið liggur væl fyri. Beint uppat einum sethúsaøki, og við vegatkomu.

Betri Banki bjóðar kommununi økið til keyps fyri 2,6 mill. kr. svarandi til 214 kr.m²

Kommunan hevur beint nú ongar ítøkiligar ætlanir við lendinum. Økið liggur í byggisamtykt A1, og er væl hóskandi til byggilendi.

Mett verður, at nú møguleikin er at ogna sær byggilendi í Kollafjarðaøkinum, eigur kommunan at taka av tilboðnum frá Betri Banka, og ogna sær økið.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl. 25/02775-10

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				

Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei
Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
6175		Keyp-søla

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
6175		Keyp-Søla	

Upphædd
2.635.000,-

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	2.635.000,00
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	0

Tilmæli:
Kommunustjórin mælir

- at keypa ognina matr.nr. 51-283a, Kollafjørður (Signabøur) frá Betri Banka fyri 2.600.000,00 kr. Keypskostnaður íroknað tinglýsingargjald og skeytiskostnað er 2.635.000,00
- at játta kr. 2.635.000 av konto 6175 keyp og søla
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Einmælt samtykt.

285/26 Stovnan av almannagagnligum bústaðarfelag

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	03.12.2025	238/25	25/10113-2
2 Býráðsfundur	11.12.2025	278/25	25/10113-2
3 Býráðsfundur	22.10.2026	285/26	25/10113-2

Upprunin til málið
Samgongan hevur í samstarvsskjalinum skrivað, at fólkið skal hava lættari atgongd til bústaðir, og at samgongan vil stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag.

Lýsing av málinum
Tórshavnar kommuna og Bústaðir ætla í felag at stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag, sum skal yvirtaka verkætlanina við Dalavegin (*Dalabú*). Hetta nýggja almannagagnliga bústaðarfelagið verður eigari av íbúðunum, meðan dagligi raksturin og umsitingin av leiguíbúðunum verður framd av Bústøðum sambært eini umsitingaravtalu, ið verður gjørd millum Bústaðir og felagið. Endamálið er at fáa fleiri leiguíbúðir á bústaðarmarknaðin.

Bústaðarpolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu leggur upp til at fleiri leigubústaðir verða bygdir. Seinastu árini eru lutfalsliga nógvar íbúðir bygdar í kommununi, flestar av teimum til eigaraíbúðir. Av tí at tað er tryggast og lættast at umseta eigaraíbúðir, so tykist tað serliga avbjóðandi hjá íleggjarum og byggiharrum at raðfesta leigubústaðir til fólkið.
Sostatt manglar kommununi fleiri leigubústaðir fyri at tryggja eina fjølbroytta fólkasamanseting.

Bústaðir fór undir verkætlanina við Dalavegin í 2023, og stóðu 44 lidnar íbúðir klárar at taka í nýtslu fyrst í 2025. Bústaðir hava eftirfylgjandi grundað á fíggarviðurskiftini í verkætlanini roynt at selja íbúðirnar sum lutaíbúðir. Áhugin fyri íbúðunum er stórur, men tað vóru ov fá, sum ynsktu at keypa ein lut. Heldur vóru tað fólk og feløg, sum høvdu áhugað í at keypa íbúðir við tí fyri eyga, at leiga út til stutttíðarleigu.

Tórshavnar kommuna og Bústaðir hava seinastu árini samstarvað um eitt nú Finsen verkætlanina, sum er bygt til lestrarbústaðir. Og nú er tíðin so komin til enn einaferð at fara undir eitt samstarv, sum hevur til endamáls at fáa fleiri leigubústaðir til kommununa.

Samstarvið er grundað í Løgtingslóg um Húsalánsgrunn § 5, sum sigur, at kommunan og Bústaðir hava heimild at stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag, sum hevur til endamáls at útvega, eiga og umsita leiguíbúðir í viðkomandi kommunu.

Lógir, ásetingar o.a.
Løgtingslóg um Húsalánsgrunnin (*Løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 29. mai 2024*).

Upplýsingar frá umsitingini
Stjórnarskrivstovan:
Sambært grein § 5 d í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (hereftir lógin) hava kommunan og Bústaðir heimild at stovan eitt almannagagnligt bústaðarfelag, sum hevur til endamáls at útvega, eiga og umsita leiguíbúðir í viðkomandi kommunu.

Hendan heimild loyvir kommununi brúka kommunalar ognir og/ella kapital til leigubústaðir.

Sambært § 5 d, stk. 2 í lógini skal kommunan seta kapital í felagið svarandi til í minsta lagi 10% og í mesta lagi 20% av samlaða útveganarkostnaðinum. Hetta innskot kann latast sum peningur, lendi ella

byggibúning, og verður roknað sum eitt rentu- og avdráttarfrítt innskot, sum kommunan fær sína lutfalsligu ognarlut aftur av, um felagið einaferð verður avtikið.

Húsalánsgrunnurin skal minst seta sama upphædd inn, og við hesum verður eginpeningurin í felagnum ongantíð minni enn 20–40%, har restin verður fíggjað við lántøku við veð í ognum felagsins.

Fíggingin verður løgd til rættis við eini samanseting av kommunalum innskoti, innskoti frá Húsalánsgrunninum og eksternum láni.

Tá fíggingin er fingin til vega, verða viðtøkur felagsins gjørdar. Viðtøkurnar skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum sambært § 5 d, stk. 3, og skulu ítøkiliga áseta stýris-/nevndarskipan, roknskap, grannskoðan, reglur um útlutan av íbúðum og áseting av leigu.

Ein umsitingaravtala verður gjørd millum felagið og Bústaðir, har dagligi raksturin og umsitingin av leiguíbúðunum verður framd av Bústøðum sambært eini umsitingaravtalu.

Tá fíggingin er fingin til vega og viðtøkur felagsins endaliga góðkendar, verður felagið stovnað har kommunan og Húsalánsgrunnurin eiga sínar lutfalsligu kapitalpartar. Felagið fær egna nevnd, har kommunan og Húsalánsgrunnurin velja síni umboð, og verður felagið síðani rikið eftir viðtøkunum og almennum reglum fyri leigubústøðir.

Tá felagið er virkið, kann tað ogna sær íbúðir, ið skulu verða leigubústaðir í kommununi. Íløgan kann annaðhvørt vera nýbygging ella keyp av verandi bygningi. Bústaðir umsitur vegna felagið síðani leigu, viðlíkahald og rakstur. Í verkætlanum á Dalavegnum verður umsitingin løgd til rættis við eini serstakari umsitingaravtalu millum felagið og Bústaðir, sum tryggjar professionellan rakstur og tann serkunnleika, sum longu er í verandi skipan .

Verður felagið einaferð avtikið, skulu ognirnar sambært § 5 d, stk. 6 býtast millum kommununa og Húsalánsgrunnin í sama lutfalli, sum teirra innskot vóru.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

-

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Býarskipanardeildin:
Seinastu árini hevur tað verið stórur fólkavøkstur í kommununi, og hevur hetta havt stórt trýst á bústaðarmarknaðin.

Tað sæst í størri mun, at spekulatión ávirkar bústaðarmarknaðin, og at vanligi borgarin harvið í minni mun hevur møguleikar at seta búgv í kommununi.

Tískil er tað av stórum týdningi fyri kommununa, at arbeitt verður við at skapa ein fjølbroyttan bústaðarmarknað, har bústaðarskylda verður lýst og har bústaðirnir ikki verða brúktir til stutttíðarleigu.

Tað er eyðsæð, at fyri at hava ein livandi og fjølbroyttan bý/kommunu, so er týdningarmikið at tryggja, at fólkið býr í býnum/kommununi og bústaðirnir ikki standa tómir stóran part av árinum.

Ætlanin at seta á stovn eitt almannagagnligt bústaðarfelag gevur í hesum samanhanginum góða meining, og verður mett neyðugt fyri at tryggja, at fleiri leigubústaðir verða bygdir í kommununi. Kommunan má luttaka í hesum partinum av bústaðarmarknaðinum, tí royndirnar siga og vísa, at privati íleggarin/byggiharrin hevur lættari við at avseta eigarabústaðir uttan bústaðarskyldu og krøvum um at avmarka stutttíðarleigu.

Sosiala deild:

Sosiala deild varar av 28 íbúðum, og tað er javnan at borgarar søkja um bústað hendanvegin. Talan er um borgarar, sum á ein ella annan hátt hava skerdar førleikar til at finna og/ella rinda fyri leiguíbúðir hjá eitt nú Bústøðum ella Mark, umframt at húsaleigan á privata marknaðinum eisini er ov høg.

Sosiala deild er áhugað í at hava 2-3 íbúðir til hendan málbólkin – afturat teimum 28, ið deildin varðar av frammanundan. Víst verður til reglugerðina, sum varð samtykt heystið 2025 í smb. við sosialu íbúðirnar. Tørvur er á íbúðunum, sum hava lægstu og/ella eina rímiliga leigu, sum ein einligur forsyrgjari kann rinda fyri – eisini um viðkomandi fær almannaveiting.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
25/10113-12: "*Framløga 25. nov 25, Dalabú*"
25/10113-12: "*Standard leigusáttmáli*"
25/10113-12: "*Tilboð uppá fígging av Dalabú - Føroya Banki*"
25/10113-12: "*Umsitingaravtala við Bústaðarfelagið við Dalabú*"
25/10113-14: "*Uppskot til viðtøkur fyri almannagagnligt bústaðarfelag*"

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	x			

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
6175		Keyp og søla				Almannagagnligt bústaðarfelag	20 mio kr

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	20 mio kr
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2025
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	0

Tilmæli:
Kommunustjórin, tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at:

1. stovna eitt almannagagnligt bústaðarfelag saman við Bústøðum,
2. at góðkenna uppskotið til viðtøkur fyri felagið,

3. at góðkenna umsitingaravtaluna millum felagið og Bústaðir,
4. at kommunan tryggjar sær 3 leiguíbúðir í felagnum til sosiala økið,
5. at flyta kr. 20 mio sum innskot í felagið,
6. og at innskotið verður goldið av konto 6175 *Keyp og søla*.

Fíggjarnevndin 03. desember 2025: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.
Ein annar minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur ikki støðu fyrr enn á býráðsfundinum.

Býráðsfundur 11. desember 2025: Annfinnur Brekkstein legði broytingaruppskot upp um at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti og fimm fyri.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

Síðani bleiv atkvøtt fyri málinum við tí broyting um at hækka talið av nevndarlimum frá trimum til fimm í viðtøkunum fyri felagið.

Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og trimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ískoyti:
Val av nevndarlimi.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Borgarstjórin skjeyt upp at velja Jeanette Ellefsen Blaasvær í nevndina

Atkvøtt varð í málinum, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

286/26 Val av 5 limum í gøtunavnanevndina

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Býráðsfundur	09.01.2025	17/25	25/00180-1
2 Býráðsfundur	22.10.2026	286/26	25/00180-1

Málslýsing:

Arbeiðssetningurin hjá gøtunavnanevndini er soljóðandi (J.nr. 2010-0496):

”Gøtunavnanevndin er ráðgevandi nevnd hjá Tórshavnar býráði. Arbeiðssetningur hennara er soljóðandi: Gøtunavnanevndin kemur við uppskotum og ger tilmæli til mentamálanevndina um gøtunøvn, nøvn á torgum og øðrum slíkum nøvnum í kommununi eftir áheitan frá umsitingini. Eisini kann nevndin verða biðin um ummæli ella tilmæli um nøvn á bygning um hjá kommununi. Mentamáladeildin út vegar skrivara.”

Í nevndini sita: Marjun Arge Simonsen, Marius Rein, Høgni Joensen, Jógvan Arge og Viggo Christiansen.

Fimm nevndarlimir skulu veljast.
Lutfalsval.

Tilmæli:
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í Gøtunavnanevndina.

Býráðsfundur 09. januar 2025: Samtykt at velja Marius Rein, Marjun Arge Simonsen, Jógvan Arge, Ronni Thomassen og Annfinnur Hjelm.

Ískoyti:
Jógvan Arge hevur boðað frá, at hann tekur seg úr nevndini.

Veljast skal nýggjur nevndarlimur.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Einmælt samtykt at velja Sannu Andrassardóttir Dahl í gøtunavnanevndina.

287/26 Dagføring av játtanarreglum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	07.10.2026	203/26	26/07503-1
2 Býráðsfundur	22.10.2026	287/26	26/07503-1
3 Býráðsfundur			26/07503-1

Upprunin til málið
Hetta málið snýr seg um at dagføra verandi játtanarreglur, soleiðis at teksturin verður greiðari og onkrar nýggjar og neyðugar ásetingar koma í játtanarreglurnar.

Lýsing av málinum
Mælt verður til at seta soljóðandi nýggjar ásetingar í játtanarreglurnar:

Punkt 4: Stuðulsjáttanir. Stuðulsjáttanir eru játtanir, sum býráði hevur samtykt til stuðul til ymisk endamál, ið verður útgoldin sambært ásettum reglum til viðkomandi endamál.

Eingin lýsing er av stuðulsjáttanum í verandi játtanarreglum.

Punkt 7: Útlegg og meirinntøkur. Tað er bert kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin, ið kunnu vera tilmælandi at leggja mál fyri fíggjarnevndina, sum ætlanin er at fíggja við útleggum ella av meirinntøkum.

Tað kemur javnan fyri, at umbønir um eykajáttan koma úr faknevndum í fíggjarnevndina, har málsviðgerar mæla til, at eykajáttan verður fíggjað við útleggi ella av meirinntøkum. Málsviðgerar hava vanliga ikki havt heimild til at mæla til at fíggja meirútreiðslur við útleggum ella av meirinntøkum, tí verður nú greitt ásett í játtanarreglunum, at tað bert er kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin, ið kunnu vera tilmælandi at leggja mál fyri fíggjarnevndina, sum ætlanin er at fíggja við útleggum ella av meirinntøkum.

Punkt 9: Tulkingarrættur. Fíggjardeildin hevur endaliga tulkingarrættin, um ivamál stinga seg upp, hvussu játtanarreglurnar skulu skiljast.

Fíggjardeildin umsitur og samskipar fíggjarætlanartilgongdina og fíggjarætlanararbeiði, men tað kemur fyri, at fólk í fyrisitingini og umsitingini ikki eru samd við fíggjardeildini, hvussu ásetingar í játtanarreglunum skulu skiljast. Tí verður mett neyðugt, at tað verður ásett í játtanarreglunum, at tað er fíggjardeildin, ið hevur endaliga tulkingarrættin, tá ið ivamál stinga seg upp, hvussu játtanarreglunar skulu skiljast.

Umframt hesar nýggju ásetingarnar, so eru ymsar orðingar í verandi játtanarreglum skrivaðar øðrvísi, soleiðis at tær eru lættari at skilja.

Lógir, ásetingar o.a.
-

Upplýsingar frá umsitingini
-

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
-

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

-

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
-Játtanarreglur (galdandi)
-Játtanarreglur (dagførdar oktober 2026)

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli: Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við hesum tilmæli, og beina málið víðari í býráðið til tvær viðgerðir.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum, við teirri viðmerking, at ein nágreina lýsing av keyp og sølu konto skal gerast.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Ískoyti:
Sambært viðmerking frá fíggjarnevndini verður keyp og sølu kontan nágreina soleiðis í dagførdu játtanarreglunum:

6175 Umsiting og røkt av fastari ogn
Alt keyp og øll søla av fastari ogn vera avgreidd umvegis hesa kontuna. Kontan verður tí eisini vanliga nevnd keyp og sølu kontan. Tað er bert kommunustjórin, ið kann vera tilmælandi at leggja mál fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina, sum ætlanin er at fíggja umvegis hesa kontuna.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Samtykt uttan avkvøðugreiðslu at beina málið beint aftur í fíggjarnevndina.

288/26 Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	18.06.2026	162/26	26/04948-1
2 Fíggjarnevndin	09.09.2026	187/26	26/04948-1
3 Býráðsfundur	17.09.2026	264/26	26/04948-1
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	199/26	26/04948-1
5 Tekniska nevnd	28.09.2026	94/26	26/04948-1
6 Vinnunevndin	28.09.2026	26/26	26/04948-1
7 Náttúru- og umhvørvisnevndin	28.09.2026	55/26	26/04948-1
8 Havnanevndin	29.09.2026	44/26	26/04948-1
9 Mentamálanevndin	30.09.2026	111/26	26/04948-1
10 Tilbúgvingarnevndin	30.09.2026	5/26	26/04948-1
11 Trivnaðarnevndin	01.10.2026	41/26	26/04948-1
12 Heilsu- og eldranevndin	01.10.2026	23/26	26/04948-1
13 Fíggjarnevndin	07.10.2026	193/26	26/04948-1
14 Býráðsfundur	22.10.2026	288/26	26/04948-1
15 Tekniska nevnd	05.10.2026	97/26	26/04948-1

Upprunin til málið
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2026, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2027 hjá Tórshavnar Kommunu.

Lýsing av málinum
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2026 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2025, tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt.

Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 3,3% í ársins prísum í 2027. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 7,9% í 2027.

Tað er rættiliga stórur munur á metta búskaparvøkstrinum hjá Búskaparráðnum í 2027 og metta vøkstrinum í landsskattinum hjá Fíggjarmálaráðnum í 2027. Hetta kemst m.a. av, at Búskaparráðið hevur gjørt nýggjar og væl hægri metinar av búskaparvøkstrinum í 2025 og 2026 í várfrágreiðingini 2026 í mun til heystfrágreiðingina 2025. Í heyst metti Búskaparráðið vøksturin í BTÚ í leypandi prísum av verða 2,0%, meðan nýggja metingin í várfrágreiðingini sigur 5,8% í 2025.

Metingin og framskrivingin hjá Fíggjarmálaráðnum av landsskattinum eitt ár fram plagar at halda betri enn framskrivingin hjá Búskaparráðnum av BTÚ, sum er munandi truplari at framskriva samanborið við landsskattin.

Flestu greinarar kring heimin vísa á, at tað er óvanliga stór óvissa knýtt at øllum búskaparligum forsagnum í løtuni. Hetta kemst serliga av kríggi, hækkandi oljuprísum, inflatión og hækkandi rentum. ECB hevur nýliga hækkað rentuna 0,25% og fleiri rentuhækkingar eru væntandi.

Stóra óvissan leggur upp til varisligar metingar av inntøkunum hjá kommununi. Í fíggjarætlanaruppskotinum 2027 verður mett, at inntøkurnar fara at vaksa 5,5% samanborið við upprunaliga samtykta fíggjarlógaruppskotið 2026.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Skatturin av eftirlønargjøldum verður tó mettur at vaksa meira enn 7% í 2027 samanborið við upprunaliga fíggjarætlanina 2026, men frá 2027 og árini frameftir fer vøksturin í skattinum av eftirlønargjøldum at fylgja vøkstrinum í vanliga lønarskattinum. Hetta kemst av, at eftirlønarskattaprosentið nú er komið í eina fast legu.

Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 4% frá FÆ-2026 til FÆ-2027. Hetta er grundað á væntaða vøksturin í sáttmálalønunum.

Ad. 3: Virksemisbroytingar
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 var samtykt, 45,5 mió. kr. Størstu virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir greinunum børng & ung, undirvísing og almanna & heilsumál.

Mett úrslit av rakstrinum í 2027 eftir tekniskar framskrivingar
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2026, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2027 vaksa inntøkurnar 5,48% og rakstrarútreiðslurnar 6,28%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 281.726 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2027. Tá er Tórshavnar Havn tikin burtur úr framskrivingini.

Skjøl
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2027
-Teknisk framskriving av FÆ-2026

Tilmæli:
Kunnað verður um málið.

Fíggjarnevndin 18. juni 2026: Framlagt.

Ískoyti:
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2027 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 18. juni 2026. Eftir hetta hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2027.

1.000 kr.		Roknskapur 2025	Ætlan 2025	Ætlan 2026	Ætlan 2027	Broyting 2026/2027 pct.	Broyting 2026/2027 kr.
Inntøkur							
20501	Kommunuskattur	1.153.244	1.099.983	1.158.556	1.220.000	5,30%	61.444
20601	Felagsskattur	71.666	58.000	58.000	60.000	3,45%	2.000
20502	Húsaleiguskattur	1.268	1.000	2.000	2.000	0,0%	0
20801	Skattur af eftirlønarinngjøldum	248.847	231.376	265.000	285.000	7,5%	20.000
20802	DIS, FAS og frádráttir	35.322	35.322	34.000	34.000	0,0%	0
20804	Kommunanna partur av Veiðigjaldi	697	800	800	800	0,0%	0
20805	Kommunanna partur av Tøkugjaldi	294	200	200	200	0,0%	0
20806	Tænastugjald á tóm býli	0	0	2.900	4.200	44,8%	1.300
	Inntøkur íalt	**1.511.338**	**1.426.681**	**1.521.456**	**1.606.200**	**5,6%**	**84.744**
Rakstur							
§1	Kommunal fyrisiting	109.199	106.920	113.025	120.718	6,8%	7.692
§2	Almanna- og heilsumál	341.784	354.202	370.740	390.447	5,3%	19.707
§3	Børn og ung	273.243	256.354	276.077	289.786	5,0%	13.709
§4	Undirvísing	59.564	57.753	61.468	67.313	9,5%	5.845
§5	Mentan og frítíð	84.772	81.001	83.728	87.779	4,8%	4.051
§6	Teknisk mál	171.758	167.051	173.734	181.345	4,4%	7.611
§7	Kommunal virkir TK	102.855	102.084	104.921	110.309	5,1%	5.388
	Rakstur íalt uttan TH	**1.143.174**	**1.125.365**	**1.183.682**	**1.247.696**	**5,4%**	**64.014**
§7	Kommunal virkir TH	-48.266	-36.985	-37.975	-37.680	-0,8%	295
	Rakstur íalt	**1.094.908**	**1.088.380**	**1.145.707**	**1.210.016**	**5,6%**	**64.309**
Aðrar útreiðslur							
20101	Stuðul til rentuútreiðslur	33.650	30.000	30.000	30.000	0,0%	0
20910	Aðrar inntøkur	961	2.000	2.000	2.000	0,0%	0
	Aðrar útreiðslur íalt	**34.611**	**32.000**	**32.000**	**32.000**	**0,0%**	**0**
	Úrslit áðrenn rentur	**381.818**	**306.301**	**343.749**	**364.184**	**5,9%**	**20.435**
Rentur							
20301	Rentuútreiðslur TK	11.148	10.962	8.867	8.195	-7,6%	-672
20301	Rentuútreiðslur TH		5.037	7.250	7.808	7,7%	558
20401	Rentuinntøkur TK	0	0	0	0	0,0%	0
20401	Rentuinntøkur TH		0	0	0	0,0%	
	Rentur íalt	**11.148**	**15.999**	**16.117**	**16.003**	**-0,7%**	**-114**
	Úrslit av rakstri TK/TH	**370.670**	**290.303**	**327.632**	**348.181**	**6,3%**	**20.549**
	Avdráttir TK	**15.900**	**22.733**	**20.003**	**20.219**	1,1%	216
	Avdráttir TH	**14.484**	**15.874**	**15.873**	**20.672**	30,2%	4.799
	Úrslit av rakstri TK/TH	**340.286**	**251.696**	**291.756**	**307.290**	**5,3%**	**15.533**
	Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*	**306.504**	**235.622**	**276.904**	**298.090**	**7,7%**	**21.185**

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

Inntøkumeting
Inntøkumetingin er gjørd av nýggjum í september, men hetta hevur ikki broytt metingina frá fyrr í ár.

Kommunuskattur
Við støði í teimum upplýsingum og ta vitan, sum var tøk í september 2026, verður kommunuskatturin mettur at hækka 5,3 % frá 2026 til 2027. Kommunuskatturin hækkar sostatt úr 1.158.566 t.kr. í FÆ-2026 upp í 1.220.000 t.kr. í hesum uppskotinum.

Húsaleiguskattur
Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026, sum er tað sama sum í FÆ-2026.

Felagsskattur
Mett verður at felagsskatturin í 2027 verður 60 mió. kr. Inntøkurnar frá felagsskattinum hevur sveiggja frá ári til ár, í FÆ26 var mett at felagsskatturin var 58 mió. kr.

Skattur av eftirlønargjøldum
Skatturin av eftirlønargjøldum er mett at hækka úr 265.000 t.kr. upp í 285.000 t.kr., sum er ein hækking á 7,5 %.

Veiðugjald
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av veiðugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 800 t. kr. í veiðugjaldi.

Tøkugjald
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av tøkugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 200 t. kr. í tøkugjaldi.

DIS, FAS og frádráttir
Inntøkurnar á hesi kontuni verða mettar at verða tær somu, sum mett var í 2026, t.e. 34.000 t.kr.

Samlaðu inntøkurnar
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu 5,6% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2026.

Rakstrarútreiðlsur
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,6%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 5,6%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2026 til 2027. Hetta er fyrst og fremst orsakað av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá skulu nýggir sáttmálar gerast.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2027.

§ 1 Kommunal fyrisiting:
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 6,8%, svarandi til góðar 7,7 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum, men eisini dýrkandi útreiðslur til kunningartøkni og KT-trygdarskipanir.

§ 2 Almanna- og heilsumál:
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,3%, svarandi til 19,7 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir og samtyktar virksemisbroytingar eru lagdar afturat.

Sosiala deild er tillagað. Virknisfremjandi tiltøk eru sett í verk, so deildin brúkar minni av uttanhýsis fyriskipanum, sæst hetta aftur í fíggjarætlanini fyri 2027, ið bert hevur ein lítlan vøkstur. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men sambært kunngerð er vistarhald til forsturforeldur hækkað við 625 tús.kr.

§ 3 Børn og ung:

Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,0%, Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Nógv størsti parturin av hækkingini er lønir, sum hækka við 9.450 mió. kr. Ein annar partur, ið ávirkar, er at vøggustovugjaldið hækkar bert 1 %, svarandi til 169 kr. fyri hvørt barn í vøggustovu. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønarstig.

§ 4 Undirvísing:
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 9,5%. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Trøðni til heildagstilboðið.

Aftrat hesum eru tað serliga tvey økir, sum gera, at raksturin á skúlunum hækkar. Allir skúlaskrivarar eru umflokkaðir, haraftrat er KT útbúnaður vorðin munandi dýrari og gjald fyri KT trygd. Eisini er sáttmálin við Nám fyri undirvísingartilfar dagførdur.

§ 5: Mentan og frítíð:
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 4,8%. Á Musikkskúlanum hækkar raksturin góðar 700 tús. kr., sum er afturberingin til landið vegna økt tímatal.

Inntøkugrundarlagið hjá Ítróttarannlegg er nærum burtur. Tað eru tvinnar orsøkir til tað. Onnur er, at býráðið hevur samtykt at eingi tiltøk skulu verða í hallinum og hin, at øll ítróttarfeløg í Tórshavnar kommunu skulu fáa ókeypis hallartímar. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað.

§ 6: Teknisk mál:
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,4%, svarandi til uml. 7,6 mió. kr. Har av eru uml. 3,5 mió. kr. vegna øktar lønir.

Viðmerkjast skal, at moldgoymslurnar, sum áður hava verið undir konto 7110 Renovatión nú eru komin undir grein 6.

Í 2027 eru tað serliga og stóru útstykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum, sum hava virksemisbroytingar við sær. Í 2026 blivu virksemisbroytingarnar frá Havnarvegnum við íbindingum og Húsareynstunlinum býttar í 2 til 4, soleiðis at summar av hesum virksemisbroytingunum koma inn í 2027 eisini, og aðrar koma inn í 2027-2029.

Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa. Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 var 3,6 mió. kr. og fyri 2027 verður hetta uml. 3 mió kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum eru í 2019-2026 øktar 36%. Tó hava lønarvøkstur og øktir tilfarskostnaðir merkt, at neyðugt er við 16% aftrat í øktari játtan, um støði frá 2020 skal haldast. Hetta kann ikki koma undir virksemisbroyting, men ynski verður sett fram um, at játtanin kann økjast tilsvarandi, møguliga yvir eitt 2 ára skeið.

Útreiðslur til Fríðkan og viðlíkahald og røkt av kirkjugørðum økjast við 7,4%, svarandi til 1,4 mió kr., men tað er íroknað, at raksturin av moldplássunum í kommununi fer inn undir hetta økið frá grein 7. Um henda flyting ikki verður roknað við, er talan um eina netto øking á undir 4%.

§ 7: Kommunal virkir:
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,1%, svarandi til uml. 5,4 mió. kr., tá er Tórshavnar havn ikki við.

Mett verður, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 0,3 mió kr. hægri í 2027 enn tær vóru í 2026, svarandi til 0,8%. Væntað netto úrslit er 37,7 mió kr.

Kommunala brennistøðin fer at kosta Tórshavnar kommunu 4,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta er mest vegna lønarhækkingar og at nýggjur sáttmáli um ruskinnheintan kemur í gildið í oktober 2026. Hetta er eisini íroknað, at raksturin av moldplássunum er farin undir grein 6.

Brandstøðin fer at kosta 10,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta yvirskipað vegna øktar útreiðslur til leigu av nýggjum sløkkibili, og vegna øktan kostnað til tilfar og útgerð.

Bussleiðin fer at kosta 3,3% meira í 2027 enn 2026, og er hetta mest vegna útreiðslur í samband við indeksregulering av sáttmálanum við veitaran.

Skattafíggjaðar íløgur
Í hesum uppskotinum eru góðar 298 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna byggir nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, undirvísing og mentan. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

Tilmæli:
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Framlagt.

Tekniska nevnd 28. september 2026: Tikið av skrá orsakað av vantandi upplýsingum í fíggjarpostum fyri tekniska økið á íløgusíðuni.

Vinnunevndin 28. september 2026: Framlagt.

Náttúru- og umhvørvisnevndin 28. september 2026: Framlagt.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við framløgdu fíggjarætlan.

Havnanevndin 29. september 2026: Framlagt.

Mentamálanevndin 30. september 2026: Framlagt.

Bergur Robert Dam Jensen ger vart við at vantandi hølisviðurskiftini við vøggustovuna í Kollafirði, er ynskiligt at neyðuga fíggingin finst í fíggjarætlanini.

Annfinn Brekkstein ynskir vindverju í vøggustovuni á Velbastað.

Tilbúgvingarnevndin 30. september 2026: Framlagt.

Trivnaðarnevndin 01. oktober 2026: Framlagt.

Heilsu- og eldranevndin 01. oktober 2026: Framlagt.

Tekniska nevnd 05. oktober 2026: Framlagt.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Uppskot til íløguyvirlit varð lagt fram.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til fyrstu viðgerð.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur støðu á seinni fundi.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint til aðru viðgerð.

289/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	18.02.2026	48/26	26/00100-1
2 Býráðsfundur	26.02.2026	67/26	26/00100-1
3 Fíggjarnevndin	17.03.2026	73/26	26/00100-1
4 Býráðsfundur	19.03.2026	96/26	26/00100-1
5 Fíggjarnevndin	22.04.2026	99/26	26/00100-1
6 Fíggjarnevndin	29.04.2026	107/26	26/00100-1
7 Býráðsfundur	30.04.2026	136/26	26/00100-1
8 Býráðsfundur	05.05.2026	169/26	26/00100-1
9 Fíggjarnevndin	13.05.2026	128/26	26/00100-1
10 Fíggjarnevndin	27.05.2026	134/26	26/00100-1
11 Býráðsfundur	04.06.2026	198/26	26/00100-1
12 Fíggjarnevndin	10.06.2026	154/26	26/00100-1
13 Fíggjarnevndin	18.06.2026	163/26	26/00100-1
14 Býráðsfundur	18.06.2026	238/26	26/00100-1
15 Fíggjarnevndin	09.09.2026	190/26	26/00100-1
16 Býráðsfundur	17.09.2026	265/26	26/00100-1
17 Fíggjarnevndin	07.10.2026	205/26	26/00100-1
18 Býráðsfundur	22.10.2026	289/26	26/00100-1

Upprunin til málið
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Lýsing av málinum

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Ískoyti:
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 18. februar 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 26. februar 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 17. mars 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 19. mars 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri mars verður lagt frá á fundinum.

Fíggjarnevndin 22. apríl 2026: Útsett.

Fíggjarnevndin 29. apríl 2026: Framlagt.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 13. mai 2026: Útsett.

Fíggjarnevndin 27. mai 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Framlagt og góðkent.

Fíggjarnevndin 10. juni 2026: Útsett.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 18. juni 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 18. juni 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri august verður fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Framlagt og góðkent.

290/26 Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir - 21/04713

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	22.01.2025	12/25	25/02101-1
2 Fíggjarnevndin	29.04.2026	104/26	25/02101-1
3 Býráðsfundur	30.04.2026	121/26	25/02101-1
4 Býráðsfundur	05.05.2026	154/26	25/02101-1
5 Fíggjarnevndin	22.10.2026	207/26	25/02101-1
6 Býráðsfundur	22.10.2026	290/26	25/02101-1

Upprunin til málið
Mál 21/04713 – Útbjóðing av matr. nr. 1355 og 1356, Tórshavn til lutaíbúðir, Sí skjal nr. *25/02101-4, Uppruna málslýsing 21-04713*.

Lýsing av málinum
Tann 21. Juni 2023 samtykti býráðið at selja tilboðsgevara matr. nr. 1355 og 1356 fyri kr. 10.000.000,- og at fremja søluna sambært eini nærri avtalaðari gjaldsætlan.

Samráðingar hava síðani verið við tilboðsgevaran um verkætlanina, og eitt skifti søkti tilboðsgevarin um at broyta verkætlanina, so tað skuldi bera til at selja part av íbúðunum í verktætlanini sum eigaraíbúðir. Hetta hevði verið ein broyting, sum hevði kravt góðkenning frá byráðnum, tí verkætlanin upprunaliga varð boðin út sum ein verkætlan við lutaíbúðum og leiguíbúðum.

Av tí at tilboðsgevarin er komin væl áleiðis við fyrireikingunum til at fara undir bygging á teimum báðum stykkjunum, matr. nr. 1355 og 1356, Tórshavn, og av tí at hann vil sleppa í gongd skjótast gjørligt, hevur hann slept ynskinum um at fáa avgreitt málið um, hvørt fyrsti blokkur av íbúðum kann seljast sum eigaraíbúðir.

Tilboðsgevarin er tískil sinnaður til at venda aftur til ta samtykt, sum býráðið gjørdi tann 21. juni 2023, har tikið var undir við einum tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini um at selja tilboðsgevaranum matr. nr. 1355 og 1356 fyri eina tillagaða tilboðsupphædd áljóðandi kr. 10.000.000,00 og at fremja søluna smb. eini nærri avtalaðari gjaldsætlan.
Fíggjarnevndin verður kunnað um umbønina frá tilboðsgevaranum um at venda aftur til upprunaligu samtyktina hjá býráðnum, so sølan kann avgreiðast við undirskriving av skeyti upp á tær báðar ognirnar.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
21/04713

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Skjøl
25/02101-4, Uppruna málslýsing 21-04713

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar	x			
Umhvørvisavleiðingar		X		
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	X			

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei
Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**

Upphædd

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli: Mælt verður fíggjarnevndini til at umrøða kunningina um umbønina frá tilboðsgevaranum, og eru ongar viðmerkingar hesum viðvíkjandi, verður sølan av matr. nr. 1355 og 1356 avgreidd við undirskriving av skeyti upp á báðar ognirnar samsvarandi teirri samtykt, ið býráðið gjørdi 21. juni 2023. Keypspeningurin verður goldin eftir eini gjaldsætlan í trimum stigum.

Fíggjarnevndin 22. januar 2025: Málið umrøtt og tikið til eftirtektar.

Ískoyti:
Samráðingar hava verið millum RMP Projektmenning og Tórshavnar kommunu um ætlaðu leiguíbúðarbygging á Villingardalsvegi.

RMP Projektmenning er komin væl áleiðis við fyrireikingunum til at fara undir bygging á matr. nr. 1355, og hevur funnið íleggjarar til verkætlanina.

Byggjast skulu 119 leigubústaðir á matr. Nr. 1355, Tórshavn, í fyrstu syftu, og er ynski í aðru syftu at veita tilsøgn í trý ár til matr. Nr. 1356, Tórshavn.

Gjørt er uppskot til skeyti, har rindast skulu kr. 5.000.000 við undirskrivan av skeyti fyri matr. Nr. 1355, Tórshavn.

Í staðin fyri at keypa bæði stykkini beinanvegin, keypir felagið fyrst matr. nr. 1355 og fær tilsøgn (optión) upp á at sleppa at keypa matr. nr. 1356 seinni og innan trý ár.

Góðkennir býráðið broyttu treytirnar, verður matr. nr. 1356 lagt av til keyparan í trý ár, og er ein møgulig søla av hesum matriklinum treytað av, at felagið hevur hildið sínar skyldur um bygging á matr. nr. 1355.

Tá trý ár eru liðin, fellur tilsøgnin burtur, um keyparin ikki hevur keypt økið innan ta tíð.

Ásett er eisini, at kommunan átekur sær eina skyldu til at taka inn aftur óbygda partin av grundøkjunum og rinda aftur keypspeningin ella lutfalsliga partin av keypspeninginum, um keyparin ikki heldur sínar byggiskyldur og fremur alla byggiverkætlanina.

Tilmæli:
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

1. at selja tilboðsgevara matr. nr. 1355 og veita tilsøgn í trý ár um keyp av matr. nr. 1356
2. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 29. apríl 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Atkvøtt varð um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen

Ískoyti:
Lýsing av málinum:
Undirskrivaða skeytið millum HVT og Tórshavnar kommunu varð ongantíð tinglýst, av tí at avtalaði keypspeningurin fyri matr. nr. 1355, Tórshavn, varð ongantíð rindaður. Hóast hetta hevur HVT arbeitt við at finna íleggjarar til ætlaðu íbúðarverkætlanina við Villingardalsvegin.

HVT hevur verið í samráðingum við Bústaðir um at fremja íbúðarbygging á 1/3 av matr. nr. 1355, Tórshavn.

Ætlanin var, at HVT skuldi byggja íbúðirnar, og síðani selja tær til Bústaðir. Bústaðir eru tó ikki áhugaðir at bygja á lendi, sum teir ikki eiga.

Samskift hevur verið partanna millum hvussu eitt ognarskifti kann skipast á skynsamasta hátt, soleiðis at fortreytirnar fyri ætlaðu byggiverkætlanini verða tryggjaðar, og óneyðugar seinkingar kunnu fyribyrgjast.

Í hesum sambandi hava tvær møguligar loysnir verið umrøddar.

Tann fyrsta loysnin, sum eisini er tann skjóta og mest skynsama loysnin, er, at Bústaðir keypir allan matr. nr. 1355 og verður tinglýstur eigari av ognini. Bústaðir søkir síðani um byggiloyvi til ætlaðu íbúðarbyggingina, samstundis sum Bústaðir søkir um sundurbýti av ognini.

Tá matrikulmálið er endaliga avgreitt, og um Bústaðir ikki hevur ætlanir um at brúka tað eftirverandi lendið til framhaldandi íbúðarbygging, verður hesin parturin av ognini seldur aftur til HVT.

Tann seinna loysnin, sum eisini er tann mest tíðarkrevjandi loysnin, er, at avtala verður gjørd millum HVT og Bústaðir um søluav umleið einum 1/3 av matr. nr. 1355, sum skal nýtast til ætlaðu íbúðarbyggingina.

Fyri at fremja seinnu loysnina, verður neyðugt at býta matr. nr. 1355 sundur, soleiðis at tann parturin, sum Bústaðir skal yvirtaka, verður matrikuleraður sum sjálvstøðug ogn. Málsviðgerðartíðin kann taka upp ímóti einum ári, áðrenn málið um sundurbýti av ognini er avgreitt.

Seinna loysnin kemur at seinka tíðarætlanina fyri ætlaðu íbúðarbyggingina við Villingardalsvegin.

Samanumtikið er fyrra loysnin tann, at Bústaðir yvirtekur alla ognina, áðrenn endaliga sundurbýtið verður framt, meðan seinna loysnin treytar, at neyðuga sundurbýtið verður avgreitt í sambandi við yvirtøkuna av tí partinum av lendinum, sum skal nýtast til íbúðarbygging.

Upplýsingar frá umsitingini:
Útgangsstøðið fyri sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment, vísandi til grein 44,stk. 1 í kommunustýrislógini. Tó kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði, vísandi til grein 44, stk. 2 í kommunustýrislógini.

Í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn hevur landsstýrismaðurin ásett, í hvørjum førum kommunal fastogn ikki nýtist at verða boðin alment út við sølu. Sambært § 2, stk. 1 nr. 1 í hesi kunngerð nýtist kommunal fastogn ikki at verða boðin alment út, tá talan er um sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap.

Innlendismálaráðið hevur tikið avgerð um, í skrivið til Tórshavnar kommunu, dagfest tann 11. Apríl 2013, at Bústaðir er at meta sum ein almennur grunnur stovnaður við fyriskipan av landsmyndugleikunum og er at meta sum ein sjálveigandi landsstovnur. Eisini skrivar Innlendismálaráðið, at Bústaðir er nær tengt at landsmyndugleikunum, vísandi til løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunnin.

Tórshavnar kommuna kann tí selja til Bústaðir uttan alment útboð.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:
2002-0627: "*Sjálvsognarstovnurin Vardar Íbúðir : Heitt verður á kommununa at leggja øki á Boðaneshamri sunnan fyri Posthúsið í byggistigi D - Bústaðir keypt matr. 1318a 1319b, Tórshavn*"
2013-0735: "*Bústaðir. Keypa lendi. Matr. nr. 620ai og 620 ak*"

Skjøl:
2002-0627/32: "*Býráðið 01.11.12*"
2002-0627/40: "*Innlendismálaráðið : Viðvíkjandi sølu av grundøkjum til Bústaðir - Føroya Bústaðarfelag - uttan alment útboð*"
21/04713-20: "*Virðismeting - Villingardalsvegur*"
21/04713-21: "*Útbjóðingartilfar Villingardalsvegur*"
21/04713-36: "*Villingardalsvegur projektmappa RPM (13).pdf*"
25/02101-4: "*Uppruna málslýsing 21-04713*"
25/02101-16: "*Uppskot til skeyti - HPV. Matr.nr. 1355 til íbúðarbygging_uppskot. 26.04.2026*"

25/02101-26: "*Matr 1355 undirskriva skeyti*"
25/02101-26: "*Framtíðar matrikkulering 1355*"
25/02101-27: "*Fundarnotat millum TK, HVT og Bústaðir - 13.10.2026*"
25/02101-30: "*Uppskot til broytt skeyti við Bústøðum*"
25/02101-31: "*Samskifti millum TK, Bústaðir og HVT um ásetingarnar í broytta skeytinum um sølu av matr.nr. 1355 til Bústaðir til íbúðarbygging*"
25/02101-32: "*HVT váttar at handilin ikki er gjøgnumførdur og at HVT ikki mótmælir sølu av matr 1355 til Bústaðir*"

Tilmæli:
Kommunustjórin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at loyva sølu av matr. nr. 1355, Tórshavn, til Bústaðir vísandi til uppskot um broytt skeyti við Bústøðum.

Fíggjarnevndin 22. oktober 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundinum.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við seks atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og fýra blankar atkvøður.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Heðin Mortensen og Bergur Robert Dam Jensen.

291/26 Tórshavnar havn - Verkætlanin fyri útiøkið kring nýggja terminalin "Molin"

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Havnanevndin	09.06.2026	33/26	26/04459-1
2 Havnanevndin	22.10.2026	48/26	26/04459-1
3 Fíggjarnevndin	22.10.2026	208/26	26/04459-1
4 Býráðsfundur	22.10.2026	291/26	26/04459-1

Upprunin til málið
Verkætlanin fyri nýggja terminalin “Molin”

Lýsing av málinum
Býráðið samtykti 29.februar 2024 byggiætlanina viðvíkjandi nýggja ferðafólkaterminalin “Molan”. Í samtyktini er ásett, at partarnir arbeiða víðari við at gera neyðugar tillagingar í.s.v. útiøkið, sum avsettar vórðu 16,3 mió til.

Tórshavnar havn hevur tí arbeitt við at gera neyðugar tillagingar eftir hesi raðfesting:

Evni	**Viðmerking**
ISPS, trygdarkrøv og funktionalitetur.	Hegn, portur og atkomuskipan verður uppraðfest og betrað
P-økið við havnaskrivstovuna og nýggj innkoyring út á molan	Innkoyringin út á molan og p-økið við havnaskrivstovuna verður optimerað soleiðis at størri partur av p-økinum verður varðveitt.
Ljósviðurskifti	Ljóssteyrar verða tiknir burtur og í staðin verða 3 ljósmastrar, eins og aðrastaðni á havnaøkinum, sum er ein bíligari og betri loysn.
Kantsteinar	Partar av kantsteinunum á p-økinum verða tiknir burtur og í staðin verður økið strikað. Aðrir kantsteinar verða broyttir soleiðis at til ber at flyta stóran farm tvørtur um økið.
Asfaltering	Arbeitt verður við at tillaga asfaltætlanina, soleiðis at sum mest kann asfalterast innanfyri játtanina.
Grøn økir	Grøn økir, runnar o.t. verður tikið burtur úr. Tílikt verður ikki mett at kunna vaksa úti á havnaøkinum
Búnaður	Benkur, ruskspannir, súkkluhaldarar o.t. verður minkað munandi

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

	Býráðsfundur 22. oktober 2026	Blað nr.: 1121 Forkvinnunnar merki:

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl
J.Nr. 26/04459-2 : Broytingar av útiøkinum - samanbering

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir við at taka undir við broytingunum av útiøkinum.

Havnanevndin 09. juni 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti:
Byggileiðslan fyri verkætlanina “Molin”, hevur á fundi 8.oktober 2026 og í uppfylgjandi telduposti 12.okober 2026 fráboðað, at útiøkið gerst dýrari enn áður mett.

Hóast at tað hevur verið roynt at spara har, ið tað hevur verið mett at verið ráðiligt, er Tórshavnar havn komið fram til, at kostnaðurin fyri útiøkið verður munandi størri enn upprunaliga væntað, og er metti kostnaðurin nú 27,8 mió kr., í mun til 19,6 mió kr, sum tað upprunaliga skuldi kosta. Tó er kostnaðurin av skelting á økinum ikki við í kostnaðarmetingini, tí hetta er ikki liðugt projektera, so kostnaðurin av skeltum kemur aftrat.
(Munurin millum 19,6 mió og 16,3 mió sum vóru nevndar í fyrru málslýsingini, (3,3 mió), stava frá, at el-arbeiðið fyri útiøkið í upprunatilboðnum er placerað undir høvuðsbygningin, og ikki undir útiøkið).
Sostatt er tørvur á at fáa játtað uml. 8,5 mió. kr. aftrat til liðugtgerð av útiøkinum.

Í mun til kostnaðarmetingina frá mai 2026 og teimum tillagingum, sum Tórshavnar havn mælti til í juni 2026, eru serliga hesi viðurskiftini orsøk til dýrkanina:

- Jørðarbeiðið er dýrkað vegna meiri avgrevstur og burturkoyring av tilfari
- Asfalteringin gerst meiri umfatandi enn upprunaliga ætlað og sum var projekterað
- ISPS-, el- og ljósskipan gerst meiri umfatandi og dýrari enn áður mett.

Sí skjal 26/04459-5 “Broytingar á útiøkinum – samanbering okt26” fyri nærri útgreining av broytingunum.

Stjórin í Tórshavnar havn metir, at tað er neyðugt at fáa játtað upphæddina á uml 8,2 mió. kr. nú, fyri at hesin parturin av verkætlanini ikki steðgar upp og harvið kann gerast dýrari í síðsta enda.

Upplýsingar frá umsitingini
Á løgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn eru 8,160 mió tøkar, sum ikki eru játtaðar til ávísa verkætlan. Á verkætlan P39SP “Niðurtøka svarta pakkhús”, sum er liðug, er eitt avlop á 0,375 mió kr tøkt.

Skjøl
J.nr. 26/04459-5 : Broytingar av útiøkinum – samanbering okt26.

Tilmæli:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at játta 8,160 mió. kr. av løgukarminum P00 og 0,375 mió. kr. av verkætlan P39SP, t.v.s. í alt 8,535 mió. kr. til verkætlanina P41 “Farstøð á molanum”, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Havnanevndin 22. oktober 2026:
Ein meiriluti: Birgir Nielsen, Heðin Mortensen, Guttormur í Skála og Kári Johansen tekur undir við tilmælinum treytað av, at støðlaøkið eisini verður asfalterað fyri umleið 2,5 mió kr., sum verður játtað av løgukarminum hjá Tórshavnar havn í 2027 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Meirilutin ger vart við, at tað ikki er rætt at Tórshavnar havn skal gjalda vegna ónøktandi ráðgeving og projektering av verkætlanini, sum Tórshavnar havn onga ávirkan hevur á.

Ein minniluti: Anja Weyhe tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at verkætlanin er dýrkað sera nógv. Og ongir pengar eru at finna hjá Tórshavnar havn til at gera havnaøkið á Oyrareingjum liðugt.

Fíggjarnevndin 22. oktober 2026: Umrøtt og útsett.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Tikið av skrá.

FUNDURIN LOKIN KL. 21:20

GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

Elsa Berg	Heðin Mortensen	Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk	Anja Weyhe	Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen	Guttormur í Skála	Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson	Kári Johansen	Høgni Vilhelmsen
	Birgir Nielsen	